# FRØÐI

2 / 2018 23. ÁRG. KR. 48,-



## LANDSBÓKASAVNIÐ 190 ÁR

**Ókeypis bøkur streymaðu til Føroya**

ARKTIS – EITT NÝTT GEOPOLITISKT KVØRKRATAKSØKI

GLOYMDA ELLA GOYMDA GRUNDVATNIÐ

ØLL DUGDU AT LESA Í 1700-ÁRUNUM

# Frøði hesaferð!

Tilfarið í hesari útgávuni av Frøði er fjølbroytt og tekur eisini fyri evni, sum áður ikki hava verið so ofta til viðgerðar í blaðnum.

Í góðum samsvari við burðardygga orkunýtslu gerst tað alt vanligari, at jarðhiti verður brúktur til at hita hús upp við. Tí eru seinastu tíggju árini nógvar jarðhitaboringar gjørdar kring um í landinum og tað gevur møguleikar fyri neyvari gransking. Í greinini *Gloymda ella goymda grundvatnið* lýsir Jana Ólavsdóttir, jarðfrøðingur, hvussu fleiri av hesum boriholum kunnu geva eina fatan av, hvussu vatnið í føroysku undirgrundini ferðast. Umframt spurningin um varandi og reina vatnveiting er spurningurin um varandi orkuveiting úr grundvatni vorðin alsamt meira aktuellur, ikki minst eftir at jarðhitaboringar í Kollafirði rendu seg í nógv og heitt grundvatn.

Í eini grein um fyrstu koppsetingarnar í Føroyum roynir Rolf Guttesen at koma fram til, hvør ið fyrstur mundi koma við koppavaksinu til Føroya. Her verða nógv skjøl tikin fram, sum kunnu varpa ljós á málið. Í síni niðurstøðu heldur høvundurin, at Leerbech, Egholm og møguliga Jomfrú Hammershaimb saman við Löbner hava ført koppavaksinu til Føroya, áðrenn Poul P. Nolsöe kom við sínari í september 1805.

5. november í ár fyllir Landsbókasavnið 190 ár og er samstundis elsti almenni stovnur í Føroyum. Í hesum sambandi skrivar Vígdis Bjarnadóttir um tíðina, tá ið stig í kjalarvørrinum á upplýsingartíðini vórðu tikin til at stovna føroyskt landsbókasavn og hvussu tað spakuliga mentist til tann týðandi mentanarstovn, sum tað er í dag. Um fyrstu gerðabókina hjá Færø Amts Bibliothek frá 1831 dregur Sámal Tróndur F. Johansen fram ymist áhugavert um umstøðurnar hjá Føroya landsbókasavni tey fyrstu árini og hvussu bókasavnið hóast truplar umstøður og trong fíggjarkor so líðandi vaks og mentist.

Í tveimum greinum viðger Jákup Reinert Hansen føroyskar sálnaskráir frá tíðarskeiðinum 1759-1785. Hetta er í eini tíð, tá ið skúlagongd framvegis stórt sæð var heimalestur, og tí vóru hesar sálnaskráir eitt høvi hjá prestunum í landinum at tekna upp og fylgja við bæði lesiførleika og vanligum kunnleika um tað, sum kirkjan helt hava størstan týdning hjá børnum og ungum at duga. Sálnaskráirnar eru helst tann søguliga kelda, sum greiðast vísir, hvør dugur var í heimalestrinum í 18. øld.

Við teimum broytingum, sum eru hendar í Arktis í kjalarvørrinum á alheims upphiting og náttúrubroytingum, er áhugin fyri økinum kring Arktis munandi øktur seinastu árini. Jens Christian Svabo Justinussen viðger tær geopolitisku broytingar, sum liggja í hesum. Høvundurin roynir at geva eitt boð upp á, hvussu Føroyar í hesum viðfangi fáa ein nýggjan leiklut og týdning, sum tær ikki hava havt fyrr.

Eyðfinn Magnussen hevur grein um, tá ið rottan í 1914 varð slept í Kunoynna. Rottan, sum nú er í Føroyum, er brúna rottan, sum kom til Føroya á einum skipsvraki, ið rak á land í Hvalba í 1768. Eftir bara nøkur fá ár hevði rottan breitt seg til aðrar oyggjar eisini. Í Norðuroyggjar kom brúna rottan tó ikki fyrr enn 120 ár, eftir at hon fyrstu ferð var komin til Suðuroynna. Í greinini verður sagt frá royndum at týna rottuna aftur í Kunoynni.


FRØÐI 2 / 2018

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
Svanamerktur prentlutur 541 705

FØROYA FRÓÐSKAPARFELAG
GEVUR FRØÐI ÚT


© Føroya Fróðskaparfelag og høvundarnir.


Frøði er fólksligt vísindablað, sum kemur út tvær ferðir árliga.

Upplag 1.300
ISSN 1395-0045
Forsíðumynd: Landsbókasavnið

*Loyvt er at endurgeva út Frøði, um víst verður til heimildina. Verða heilar greinir endurgivnar, má avtala gerast.*

AVGREIÐSLA
Jarðfeingi, J. Paturssonargøta 32-34
Postsmoga 3059
FO-110 Tórshavn
Tlf. 357000
teldupostur: frodi@jf.fo

RITSTUÐLAR
Fróðskaparsetur Føroya
Tjóðskjalasavnið
Tjóðsavnið
Landsbókasavnið
Havstovan
Heilsufrøðiliga Starvsstovan
Jarðfeingi
Umhvørvisstovan

NÝGGIR HALDARAR
kunnu tekna seg hjá avgreiðsluni.

ELDRI ÚTGÁVUR AV FRØÐI
fáast við at venda sær til avgreiðsluna.

GREINIR TIL BLAÐIÐ
Fólksligar, vísindaligar greinir kunnu sendast ritstjórnini. Skrivlig høvundaleiðbeining fæst frá avgreiðsluni.

LÝSINGAR TIL FRØÐI
Er áhugi fyri at lýsa í blaðnum, setið tykkum tá í samband við avgreiðsluna, telefon 357000
fax 357001
teldupostur: frodi@jf.fo

LÝSINGARPRÍSUR
Heil síða: kr. 5.000,-
Hálv síða: kr. 3.000,-

RITUMBOÐSRÁÐIÐ
Erling Isholm, Fróðskaparsetur Føroya
Erla Olsen, Fróðskaparsetur Føroya
Sámal Tróndur Johansen, Tjóðskjalasavnið
Bjørg Mikkelsen, Heilsufrøðiliga Starvsstovan
Maria Dam, Umhvørvisstovan
Lis Mortensen, Jarðfeingi
Eilif Gaard, Havstovan

GRAFISK FRAMLEIÐSLA OG PRENT: Føroyaprent

SAMSKIPARI
Helgi Jacobsen

RITSTJÓRN
Zakaris Svabo Hansen *ábyrgd*
Áki Vang
Óluva Eidesgaard
Katrin Hoydal
Kirstin Eliasen
Winny í Pætursastovu

FRÓÐSKAPARFELAG FØROYA
Heimasíða: www.frodskaparfelag.fo
Limagjald: 300 krónur um árið, at gjalda á konto í Eik Banka 9181-495.171.0
SWIFT code: EIKBFOTF,
Iban-no: F056 9181 0004 9517 19
*Minnist til at viðmerkja navn.*














# Innihald


2 FRØÐI HESAFERÐ

4 GLOYMDA ELLA GOYMDA GRUNDVATNIÐ
Jana Ólavsdóttir

10 TÆR FYRSTU KOPPSETINGARNAR Í FØROYUM – NÆR, HVAR OG HVØR?
Rolf Guttesen

16 FØROYSKAR SÁLNASKRÁIR 1759-1785: GREIN 1: ØLL DUGA AT LESA Í BÓK
Jákup Reinert Hansen

20 FØROYSKAR SÁLNASKRÁIR 1759-1785: GREIN 2: Á FERÐ UM PRÓSTADØMI FØROYA
Jákup Reinert Hansen

26 TÁ ROTTAN VARÐ SLEPT Í KUNOYNNA
Eyðfinn Magnussen

30 HISTORY.FO – HENT LEITIAMBOÐ
Frøði

31 SØGUR UM ORÐ: FÆ OG FELAG
Zakaris Svabo Hansen

32 LANDSBÓKASAVNIÐ 190 ÁR
Vígdis Bjarnadóttir

36 BROT ÚR GERÐABÓK FÆRØE AMTS BIBLIOTHEK
Sámal Tróndur F. Johansen

40 ÓKENDUR LEIKLUTUR HJÁ FØROYUM: ARKTIS - EITT NÝTT GEOPOLITISKT KVØRKRATAKSØKI
Jens Chr. Svabo Justinussen



Mynd 1. Myndin vísir Romica Øster, Jarðfeingi, og William Bærentsen, í starvsvenjing á Jarðfeingi, máta hitalagið á heita vatninum í Kollafirði oktober 2014.

# Gloymda ella goymda grundvatnið


**Jana Ólavsdóttir**
jo@jf.fo

jarðfrøðingur, PhD
Jarðfeingi


Fyrstu jarðhitaboringar í Føroyum vórðu gjørdar fyri umleið 10 árum síðani, og higartil eru á leið 250-300 boringar gjørdar. Fleiri av hesum boringum hava víst seg at innihalda nakað av vatni, og við at fáa vatnið í boriholum mált og staðsett við atliti at jarðfrøðini á staðnum skilja vit uppaftur betur, hvussu vatnið í føroysku undirgrundini ferðast. Okkurt um 50-60 av boriholunum eru máld, og vónin er at fáa flest øll borihol máld í komandi tíðum.

Higartil hava møguleikarnir at útvinna ella á annan hátt at gagnnýta grundvatn í Føroyum verið lítið kannaðir. Ein orsøk til tess er óivað, at føroyska undirgrundin er bygd upp av basaltfláum, sum ikki kunnu innihalda ella geva frá sær serliga nógv vatn. Tó hevur kelduvatn verið brúkt sum vatnveiting til bygdir og smoltstøðir kring landið, og fólk hava vitað um heitar keldur í øldir.

Hóast tað í tíðarskeiðum hevur verið hugt at grundvatnsspurninginum ymsarstaðni kring landið, til dømis tá borað varð fyri Sumbiar- og Norðoyatunlunum ella í sambandi við jarðhitaboringar, so er tørvur á einum skipaðum átaki fyri at skilja hesi viðurskifti um allar Føroyar.

Umframt spurningin um varandi og reina vatnveiting er spurningurin um varandi orkuveiting úr grundvatni vorðin alsamt meira aktuellur, ikki minst eftir at jarðhitaboringar í Kollafirði rendu seg í nógv og heitt grundvatn (mynd 1).

* *Kanningarverkætlanin er gjørd saman við Mariah Schug, PhD, Widener University, USA*

**Mynd 2.** Myndin vísir, hvussu grundvatnið situr í føroysku undirgrundini. Bláa brotastrikan vísir grundvatnsborðið, og svørtu pílarnir vísa, hvussu vatnið ferðast í undirgrundini.




## Hvussu grundvatnið situr í føroysku undirgrundini

Eins og aðrastaðni er undirgrundin í Føroyum niður frá einum ávísum dýpi fylt við grundvatni. Hetta dýpið nevnist grundvatnsborð (mynd 2a). Í høvuðsheitum kann sigast, at grundvatnsborðið fylgir lendinum, so tað liggur hægri undir hálendi enn láglendi. Summastaðni stingur grundvatnsborðið upp úr lendinum, og tá verður ein tjørn ella eitt vatn í landslagnum, til dømis í eini lægd ella í einum dali. Eisini kann ein vatnførandi lind liggja í eini fjallasíðu, soleiðis at vatn rennur úr henni og út í lendið (mynd 2b). Tá verður vanliga tosað um eina keldu. *Artesiskt* vatn, sum verður nýtt um vatn, ið av sær sjálvum setur upp í lendið ella úr einum boriholi, tí at grundvatnsborðið liggur yvir lendinum á staðnum (mynd 3, boring 3).




**Mynd 3.** Myndin vísir, hvussu vatn kemur inn í boriholini – gjøgnum rivur, fláamørk og legugrýtislindir – í føroysku undirgrundini.

## Fláir og rivuløg

Føroyar eru bygdar av basalti, sum í stóran mun er eitt tætt grótslag, og sum áður nevnt, í sær sjálvum inniheldur lítið av vatni. Í støðum kann tað tó vera poknut, men av tí at lítið og einki samband vanliga er millum tær einstøku poknurnar, er gjøgnumstroymið lágt. Nógvastaðni eru tílíkar basaltfláir tó meira ella minni rivutar, og grundvatnið situr í stóran mun í hesum rivum og rivuløgum – t.e. fleiri rivur tætt upp at hvørjari aðrari (mynd 2c, d & e). Eisini kann vatn sita á markamótinum millum tær ymisku basaltfláirnar (mynd 2f), serliga í legugrýtislindum, sum nógvastaðni finnast ímillum tær fastaru basaltfláirnar. Hesar legugrýtisfláir kunnu vera porøsar (hava høgt poknustig) við høgum gjøgnumstroymi og summastaðni vera upp í fleiri metrar tjúkkar (mynd 2g). Tí er tað av stórum týdningi at kenna jarðfrøðiligu umstøðurnar í økinum, har leitað verður eftir grundvatni, tí eins nógv og tøkt vatn situr ikki allastaðni í undirgrundini.

Leiting eftir kolvetni, grundvatni og jarðhitaorku hevur nógv til felags. Til dømis er neyðugt at finna eina góða goymslu ella goymslugrýti. Innan kolvetnisleiting skal goymslugrýtið vera partur av einum lokaðum strukturi á einum stað, har olja og/ella gass eru búnað. Í sambandi við grundvatnsleiting er tað harafturímóti nóg mikið at hava eitt gott goymslugrýti ella opnar rivur, tí vatn finst allastaðni undir grundvatnsborðinum.

## Ringstreymsskipan

Opnu rivurnar kunnu vera bundnar á ein hátt, so at ein ringstreymsskipan kann vera stovnað. Tá kann heitt vatn koma upp úr jørðini við ringstreymum (konvektión), sum virka í eini opnari rivuskipan, har samband er millum tær einstøku rivurnar, soleiðis at vatnið kann ferðast gjøgnum hesar rivur frá yvirflatuni niður í dýpið og uppaftur (mynd 3). Nýtt vatn kemur vanliga inn í eina tílíka skipan frá regni í onkrum fjallalendi í nánd. Tungt, kalt vatn søkkur støðugt niður í dýpið og verður hitað har, og heitt, lætt vatn kemur upp í staðin í eini konvektiónsringrás. Við konvektiónsvatninum verður hiti tikin úr dýpinum og fluttur upp í tey grynru jarðløgini (mynd 4). Grótið í dýpinum gerst sostatt lutfalsliga kaldari, enn vanligt er á hesum dýpi, ímeðan grótið longri uppi verður hitað upp.

**Mynd 4.** Eitt dømi um, hvussu ein ringstreymsskipan virkar. Bláu pílarnir vísa leiðina hjá kalda vatninum niður í dýpið har tað verður hita upp (reyðir pílar).






**Mynd 5.** Málda hitastigið pr. dýpi í vatninum á ymiskum boringum í Føroyum. Reyðu kurvarnar vísa mátingar av boriholum, har vatn rennur út av sær sjálvum (artesisk hol), meðan grønu kurvarnar vísa borihol, har vatn ikki rennur út.

## Jarðhitavøkstur

Hitin, ella hitastigið, í jørðini økist við dýpinum. Hitavøksturin niður eftir í føroysku undirgrundini er uml. 25-35 °C/km, og vísast kann á, at hitin á vatninum í botninum á Lopra-1 boringini – sum er djúpasta boring í Føroyum higartil við sínum uml. 3500 m – er 98 °C.

Hitavøksturin í boriholum er nógv ávirkaður av, um boringin er artesisk. Sigast kann, at tað eru trý sløg av boriholum í Føroyum:

1. Artesisk borihol, har vatn rennur út úr holinum av sær sjálvum (mynd 3).
2. Boringar, har vatn situr upp til eina vissa dýpd í boriholinum (mynd 3).
3. Boringar, har einki vatn er í (mynd 3). Hesar boringarnar eru sjáldsamar, tí vatn kemur niður í boriholið undir boring og við regninum og verður so sitandi, tí tað sleppur ikki burtur aftur.

Artesisk borihol innihalda vanliga heitari vatn enn ikki-artesisk borihol (mynd 5), meðan hitavøksturin ofta er lægri (mynd 6). Hetta kemst av tí, at tá stórar mongdir av vatni koma inn í boriholið – gjøgnum rivur og fláamørk – verður hitamunurin minni niður gjøgnum boriholið, og tí verður hitavøksturin lægri (mynd 6, reyðir prikkar). Eisini kann sigast, at hitavøksturin í ikki-artesiskum boriholum vanliga er hægri í boriholum, sum liggja norðan fyri breiddarstig 62,10°N í Føroyum, t.e. norðan fyri Kaldbaksbotn, við einum hitavøkstri omanfyri 3 °C/100 m, meðan hitavøksturin sunnanfyri er minni enn 3 °C/100 m (mynd 6).

## Samandráttur

Síðani byrjað varð at gera jarðhitaboringar í Føroyum fyri umleið 10 árum síðani, eru á leið 250-300 boringar gjørdar. Fleiri av hesum boringum hava víst seg at innihalda nakað av vatni, og við at fáa vatnið í boriholum mált og staðsett við atliti at jarðfrøðini á staðnum skilja vit enn betur, hvussu vatnið í føroysku undirgrundini ferðast. Higartil eru umleið 50-60 av hesum boriholum máld, og vit vóna at fáa flest øll borihol máld í framtíðini.

Umráðandi er at fáa sett eina greiða mannagongd í verk fyri at kanna jarðhitaboringar, sum verða gjørdar í framtíðini, við til dømis at gera hitamátingar av vatninum. Hetta krevur neyðuga loggútgerð at gera mátingar í boriholinum við. Eisini er neyðugt, at mannagongdir verða gjørdar saman við borifelagnum ella eigara av holinum, soleiðis at Jarðfeingi til dømis kann koma at gera tilíkar uppmátingar 14 dagar aftaná, at boringin er liðug og áðrenn holið verður tikið í nýtslu til hitapumpuskipanina.

Um føroyska samfelagið skal gera sær vónir um at bora eftir grundvatni til drekkivatn ella nýta tað í orkuhøpi, so er tað av alstórum týdningi at kenna til fláamørk og rivuskipanir, sum leiða vatnið runt í undirgrundini. Av teimum jarðhitaboringunum, ið higartil eru gjørdar, eru umleið 10-15% artesiskar, sum man av tilvild hevur rakt við. Summar av teimum renna við áleið átta-níggju tonsum um tíman. Við at kenna rivuskipanir og fláamørk, sum flyta vatn runt í ávísum økjum, so kann roknast við, at títtleikin av artesiskum boringum fer at hækka heilt eyðsýnt til gagns fyri bæði borgarar og vinnulív. Hetta tí at vatnið í undirgrundini óivað er reint, tí undirgrundin í ávísan mun reinsar vatnið.

Regnvatn og tíverri eisini annar løgur hevur lætta atgongd til undirgrundina umvegis opnu rivuskipanirnar. Tað er tí eisini av alstórum týdningi at hugsa um, hvat verður burturbeint úti í náttúruni, soleiðis at komandi ættarlið framhaldandi kunnu drekka reint grundvatn. Í dag er drekkivatnskipanin í nøkrum bygdum í Føroyum bygd á grundvatn, eitt nú á Argjum, í Lopra, í Sumba og á Eiði.




**Mynd 6.** Jarðhitavøkstur (x ásin) í ymiskum boriholum í norðara parti av Føroyum (y-ásin). Teir reyðu prikkarnir vísa hitavøksturin í boriholum, har vatn rennur úr, meðan teir grønu prikkarnir vísa hitavøksturin í boriholum, har einki vatn rennur úr. Breiddarstigið 62,1°N á y-ásanum er á leið, har Kaldbaksbotnur er.


**KELDULISTI:**

Debes, L.J., 1673. Færøæ & Færon Reserata. Kjøbenhaffn.

Forchhammer, J.G., 1821. Rejse til Færøerne. Dagbog Fortsættelse 23. Aug. til 21. Sept. Breve IV (Udgivet af Ad. Clément). København 1927.

Kelstrup, N., 1983. Noter vedrørende hydrologiske og hydrogeologiske forhold på Færøerne. Geologiske Undersøgelser for Danmark og Grønland, Report no. 26857, 1-52.

Mortensen, L., 2014. "Nógv og heitt vatn í Kollafirði." Í *Frøði 3/2014*.

Noe-Nygaard, A., 1942. "Varmakelda" paa Østerø. Special issure of Naturens Verden.

Ólavsdóttir J., Mortensen, L., Heinesen, M. V., Øster, R., Mortensen, K., og Johanneson,. A., 2015. Grundvatn í Føroyum. Jarðfeingi Frágreiðing vol. 4, 2016, vol. 1, 2015.

Ólavsdóttir, J., Heinesen, M. V., Eliasen, M., Mortensen, L., Eidesgaard, Ó. R. og Mortensen, K., 2016. Jarðhitaboringar á Lygnnesi, Kollafjørður. Jarðfeingi Frágreiðing, vol. 4, 2016.

Saemundsson K., Gudni Axelsson G. og Steingrímsson B., 2013. Geothermal systems in global perspective. Presented at „Short Course on Geothermal Drilling, Resource Development and Power Plants“ organized by UNU-GTP and LaGeo, in Santa Tecla, El Salvador, January 16-22, 2011.



**Mynd 1.** Læknin Jenner hevur teknað hesa hond av neytakonu við pokum. Gjørd til bókina „An Inquiry“ 1798. Her úr bókini hjá Bonderup.

# Tær fyrstu koppsetingarnar í Føroyum

Pokur vóru fyrr í tíðini ein ring og smittandi sjúka, sum var kend um alla verðina. Hon var eisini kend í Føroyum. Hon gekk sum umfarsjúka bæði í 1651 og 1709. Serliga í 1709 var hon ring í Havn. Tá doyðu umleið 250 fólk av teim 300, sum búðu har. So einki undur var í, at myndugleikarnir ansaðu væl eftir, tá fremmand skip komu inn. Tey skuldu hava váttað heilsubræv at vísa fram. Elin S. Jacobsen[1] hevur eina umfatandi og góða frágreiðing um pokur og koppseting, men nertir bert leysliga við spurningin um, hvør ið var fyrstur at koppseta.




**Rolf Guttesen**
RolfG@setur.fo
Lektari í geografi


Sjúkan var mest ein barnasjúka, og orsøkin var ein virus. Sjúkugongdin var vanliga ógvuliga pínufull[2]. Tey fyrstu teknini vóru ófriður í kroppinum, seinni fór røddin at svíkja. Síðani kom eitt útbrot við rundleiddum sárum við vági. Sjúklingurin fór at lukta illa. Vanliga doyði umleið ein fjórðingur av sjúklingunum. Tað var ein pínufullur deyði. Tey, sum gjørdust frísk, fingu altíð nógv arr og vóru pokuskotin um alt andlitið og kroppin.

Eitt, sum ger tað tvørligt at koma til álítandi niðurstøður um tiltøk í Føroyum, er óvissa um orðatýdning. Flestu keldur skriva um pokur (koppar), koppseting og koppavág. Men tað er munur á neytapokum og menniskjapokum. Koppseting kann antin vera <u>inokulatión</u> við vági av menniskjapokum ella <u>vaccination</u> við vági av neytapokum.

Vit hoyra um inokulatión í Konstantinopel í byrjanini av 1700-talinum, men skjótt breiðir hugurin at lata børn inokulera, serliga millum ríkfólk og kongalig, sum høvdu ráð til tess. Ein tann fyrsti í Danmark at blíva inokuleraður við menniskjakoppum var eingin minni enn tann 12 ára gamli krónprinsurin Christian, seinni kongur Christian VII. Læknin, sum gjørdi hetta, var tann navnframi Johann Fr. Struensee.[3] Hetta var í 1761. Fleiri børn hjá teim kongaligu, hovfólkum og ríkum í býum í Danmark blivu tá og komandi árini inokulerað.

1 - Jacobsen 2004 190-207
2 - Bonderup 2001:7-8
3 - Andersen: 2018





## Nær, hvar og hvør?

### Poul P. Nolsöe og koppavaccinan

Vanligt hevur verið at givið Poul P. Nolsöe (Nólsoyar-Páll) æruna fyri, at koppavágur bleiv førdur til landið. Jakob Jakobsen hevur sínar upplýsingar úr blaðnum *Dagen*, sum í 1806 hevur tvær greinar um Poul P. Nolsöe. Jakobsen[4] endurgevur hetta í eini fótnotu:

„Men Nólsoyar-Pálli lukkaðist tað at føra koppsetingarevni frískt til Føroya á tann natúrliga og einfalda, men snilda hátt, sum eingin hevði hugsað um fyrr av teimun, sum roynt høvdu: hann koppsetti first ein av skipmonnun sínun, og so ein annan á veginun heim til Føroya við koppun … og so fram ettir, til hann kom til Føroya.“

Tá tosað verður um vaccinu og vaccinering, so merkir tað vanliga, at tað er av neytum. Orðið 'vaccina' kemur av tí latínska *Vacca*, sum merkir neyt ella kúgv.

Tað at koppseta mann av manni fyri alla tíð at hava fríska koppavág hevði verið gjørt av øðrum. Tann fyrsta koppavaccinan kom til Danmarkar[5] frá Dr. Jenner í Onglandi í 1801. Hesin var undangongumaður í royndum við at framleiða neytakoppavaccinu. Í Danmark var tað Dr. Winsløw, sum stóð fyri royndunum. Í 1806, ella fimm ár seinni, kundi staðfestast, *„at den oprindelige vaccine fra Jenner nu havde forplantet sig gennem mere end 200 børn“*, og 75.000 fólk í Danmark høvdu fingið vaccinatiónina. At vaccinan *„havde forplantet sig gennem 200 børn“* vísir til, at hon var varðveitt við at vaccinera „mann av manni.“

Anton Degn[6] hevur eina tilvísing til Kongelig Resolution frá 24. juli 1807, sum sigur, at tá: *„bevilgedes Skipper Poul Nolsöe en belønning af 100 Rdl for sin udviste Iver i at udbrede Vaccinationen paa Færøerne; ligeledes i samme Anledning hans Broder Handelsbetjent Jacob Nolsöe en Belønning af 50 Rdl.“* Tað stendur einki beinleiðis um, hvussu vaccinan kom til Føroya, ella um hann var tann fyrsti at koma til Føroya við vaccinu. Bert tað at hann gjørdi nógv fyri at útbreiða vaccinatiónina móti pokum.

Elin S. Jacobsen[7] skrivar: *„Men longu 1805, kanska 1802, vóru tær fyrstu koppsetingarnar í Føroyum.“* Spurningurin er so: nær kom Poul P. Nolsöe upp við koppsetingarevni? Vit vita av omanfyri standandi, at ein Kongalig Resolutióner er frá 24. juli 1807, og at avísin *Dagen* skrivar 27. juni 1806 um flutning av vaccinu til Føroya.

**Úr Norðoya Kirkjubók.**
Nr. 8 er drongurin Jon Frederik Henriksen, Arnefjord. So navnið á foreldrum. Hann er 15 ár. Hann er „Skikkelig“ til bíbilsøgu. Longst til høgru er at lesa um vaccinatión:
*„D. 1ste December af P. Nolsøe“*

4 - Jakobsen 1966:74, fótnota 1
5 - Skydsgard 2014
6 - Degn 1945:111
7 - Jacobsen 2004:195



**Mynd 2.** Sjúklingur við pokum.



*Spurningur 1*: Nær kunna boðini um væleydnaðan vaccinuflutning til Føroya vera komin aftur til Keypmannahavnar og vera skrivað í *Dagen*?

*Spurningur 2*: Á hvørjum túri flutti *Royndin Fríða* vaccinuna upp til Føroya?

<u>Í 1806:</u> Fyrstu skipini[8] hjá Kongliga Einahandlinum niður, *Fredens Forsvar* og *Anne Marie*, fóru av Havnini sama dag, tann 19. juni 1806. Siglingstíðin var vanliga 2-3 vikur, ofta meira. Um túrurin var hampiliga skjótur, so kundi bræv verið komið fram (og tíðindini sett í *Dagen*). Men meira sannlíkt er, at Poul P. Nolsöe við *Royndini Fríðu,* sum fór úr Føroyum tann 28. mai og kom til Keypmannahavnar tann 7. juni, sjálvur hevur borið blaðmonnum boðini.

<u>Í 1805:</u> Men so er bara ein møguleiki eftir til vaccinuflutningin upp til Føroya. Tað er tann eina túrin, ið *Royndin Fríða* gjørdi í 1805 til Keypmannahavnar og upp aftur. Úr Keypmannahavn í august, komin til Havnar í september. Um hetta roknistykkið er rætt, so komu Poul P. Nolsöe og koppavaccinan til Havnar <u>2. september 1805.</u>

Men kanska var Poul P. Nolsöe ikki tann fyrsti? Um royndina hjá Poul P. Nolsöe skrivar *Dagen* 27. juni 1806:

„Ifjor, da han var i Kbhvn, lod han en af sine Matroser vaxinere af Hr. Dr. Blech, og bragte saaledes frisk Materie til Hjemmet, hvor han med Vedholdenhed, Bekostning og Overtalelse har faaet dette herlige Middel betydeligen udbredt." .

Eftirsum *Dagen* her skrivar "vaxinere", so mugu vit ætla, at her meinast við neytakoppavaccinu. Tann nevndi Dr. Blech var í fólkateljingini í 1801[9] registreraður sum Georg Blech, 24 ár, ógiftur og Chirurgus í Keypmannahavn.

## Miseydnaðar flutningsroyndir ella?

Seinni sama heyst skrivar *Dagen*[10] um flutning av vaccinu og nevnir fýra royndir:

„Fire Gange var forhen forsøgt paa at bringe Vaxinematerien hertil paa Glas; første Gang forsøgte Hr. Laugmand Lund samme; den anden gang forsøgte Kapt. Löbner, 3die Gang Hr. J. Egholm, 4de Gang Forvalter Mørck, som skeede i sidste Foraar med 14 godt forseglede Glas; og derfor bør troes, at havde ikke Kapt. Nolsöe paa den naturlige Maade faaet Vaxinen hidbragt, havde det maaske aldrig skeet"

Hesir nevndu eru allir væl kendir menn, uttan kanska Egholm. Men tað man vera Johan Hendrik Egholm, bóndi í Hvalvík, sum fyrr hevði verið skipslækni í russiska flotanum. Teir nevndu fýra persónarnir, sum sigast at hava gjørt roynd at flyta vaccinu til Føroya, hava allir verið í Danmark í tíðarskeiðinum millum 1800 og 1805. Tí er tað møguligt, at teir hava roynt at hava vaccinu heim við. Teir eru:

Lund, løgmaður, kom úr Keypmannahavn við *Anne Marie* tann 10. juni 1802.

Löbner, Captainur, kom úr Keypmannahavn skipinum *Anne Marie* tann 4. oktober 1801. Hann avloysti Kühn sum skansakommandant. Við sama skipi, sigur Skansaprotokollin 1801, vóru umframt Löbner eisini pastor Begtrup, Madam Borck og *„Jomfr. Hammershaimb <u>syg af Kopper.</u>*" Nærri um hetta seinni.

Joen Hendrik Egholm, bóndi, fór niður 15. mai og kom aftur úr Keypmannahavn við *Fredens Forsvar* tann 9. august 1805.

Mørck, handilsforvaltari, kom úr Keypmannahavn við skipinum *Carl* tann 22. juni 1805.

## Fleiri hava koppsett áðrenn 1805

John Davidsen[11], lærari og granskari, helt í 1984 nakrar fyrilestrar á Fróðskaparsetrinum. Davidsen sigur í fyrilestrunum, at fleiri persónar høvdu koppsett í Føroyum. Hann hevur í kirkjubókum funnið fimm dømir um koppseting millum 1802 og 1805.

Niðurstøðan hjá Davidsen er eyðsæð. Poul P. Nolsöe var *ikki* tann fyrsti, sum skaffaði óspilta koppavaccinu til Føroya. Leerbech, sum Davidsen nevnir, ið var prestur í Norðurstreymoy frá 30. mai 1800 til 1807, kom til landið fyrstu ferð tann 25. august 1800 við Handilsins skipi *Cathrine Margrethe*. Í ferðalagnum upp vóru eisini Skipper Nolsöe og studiosus Svaboe. Kanna vit eftir í kirkjubókum fyri Norðstreymoyar prestagjald 1816-1832 og Eysturoyar prestagjaldi 1816-1832 finna vit hetta:

Susanne Hansdatter, Skielling,
født 2. februar 1802,
*„Vaccineret af Hr. Leerbech 1802* " (eingin dato)[12]

Kristine Elsebeth Joensdatter í Kvívík,
født 9.december 1800,
*„Vaccineret af Hr Leerbech 1805*"[13]

8 - Skansajournalir og Claus Lund
9 - Dansk Demografisk Database, Rigsarkivet <DDD>
10 - Jakobsen 1966: nota 1 á s. 74 og Dagen 31. oct 1806
11 - Davidsen 1984, Band 3 A, 000-197
12 - Norðstreymoyar Kirkjubók (1816-1832), 1817, Konfirmerede
13 - Ibidem



**Mynd 3.** Úr kirkjubókini fyri Norðoyar. Gentan Katrine Marie Olesdatter fra Gierdum varð konfirmerað í Waaj Kirkju í 1819. Hon varð vaccinerað av Poul Nolsøe tann 2. oktober 1819. Hansara navn sæst til høgru á myndini.

Christine Maria Hansdatter, Nordskaale,
doypt 7. juni 1802 í Hvalvík.
*„Vaccineret den 11. May 1805 af J. Egholm“*[14]

Maren Sophie Peders Datter, sum Davidsen nevnir, sum Poul á Látrinum, Poul Joensen, hevur vaccinerað, havi eg ikki funnið enn. Men Poul Joensen hevur annars koppsett nógv børn eitt sindur seinni í tíðini.

Jens Henrich Djurhuus, Siow,
født 18. mars 1799,
*"Vaccineret 1804 af Faderen"*[15]

Kirkjubøkurnar brúka í øllum førum orðið „vaccinatión,“ so tað bendir á, at tað var neytakoppavaccina. Ein lítil viðmerking er í skipalistanum í Skansaprotokollini 4. oktober 1801 undir teiginum *„Har passagerer medbragt“*. Har er skrivað *„Jomfr. Hammershaimb syg af kopper,“* og tað sigur møguliga nakað heilt nýtt.

Orðini kunna útleggjast uppá tveir mátar. Antin hevur hon verið veruliga sjúk av koppum, ella hevur hon verið seinasta lið í ketuni av persónum umborð, sum hevur hildið koppavágina fríska, og soleiðis hevur man longu í 1801 havt fríska koppavág í Føroyum. Captain Löbner var, sum longu nevnt, við á hesum túrinum upp, og hann hevði lært nakað av læknafrøði, áðrenn hann fór upp í militerið. Tað kann hugsast, at tað var hann, sum skipaði fyri hesi flyting av koppavaccinu. Her er ein møguleiki, men einki endaligt prógv.

## Pro Memoria til løgmann, sorinskrivara og fúta

Ein onnur kelda gevur vissar ábendingar, men er heldur ikki tað endaliga prógvið. Rentukamarið skrivar tann 16. januar 1802 eitt bræv, sum er adresserað til allar teir hægstu embætismenninar – teir tríggjar J. M. Lund, løgmann, L. Olsen, sorinskrivara, og W. Hammershaimb, fúta. Ørindini í hesum Pro Memoria[16] eru at fáa upplýsingar úr øllum landinum um, hvussu tað gongst við koppsetingini.

„De [anmodes] om at anbefale *Vaccinationen* blandt Almuen paa *Færøerne*, samt paalægge alle Lægerne sammesteds, saa ofte som mueligt, at tilstille ommeldte Commission saavel Lister over de af dem *Vaccinerede*, som *Resultatet* af deres Erfaringer i denne henseende.“

Hetta Pro Memoria er skrivað til føroysku myndugleikarnar longu í januar 1802, og tað er áðrenn nakað av dømunum um vaccinatión, sum Davidsen nevnir. So eru bert tveir møguleikar:

Antin er ein vaccinatión farin fram áðrenn 1802, sum myndugleikin í Keypmannahavn hevur vitað av og tí biður læknar senda listar og frágreiðingar inn til Koppa-commisiónina um úrslitini.

Ella er hetta eitt brævt sent øllum heilsumyndugleikum í Danmark og tí eisini teimum í Føroyum, hóast eingin koppseting enn er farin fram har.

Tað kann týðast sum vantandi kunnleiki, at brævið nevnir bæði „Læger og Chirurger“, tí har var bara ein lækni: Chirurgus H. Schnell[17], sum røkti starvið 1782-1806. Men "læge" í eldri donskum kann vera annað enn ein útbúgvin doktari. Ein lækni[18] kann vera *„En person der giver sig af med at helbrede syge og saarede“*. So kunna „koppsetarar“ og aðrir við fáa heitið lækni. Um tað fyrra er rætt, so undirbyggir tað møguleikan, at frískur koppavágur er komin við Jomfru Hammershaimb.

Best møguliga tíðarlinjan kann vera hendan:
Tann 4. oktober 1801 kom Jomfru Hammershaimb við koppasjúku ella frískum koppavági, og Löbner og aðrir eru beinanvegin farnir at vaccinera.

Tann 19. november 1801 fór *Cathrine Margrethe* niður við boðum um væleydnaða vaccinering.

Tann 16. januar 1802 skrivar Rentukamarið aftur til myndugleikarnar í Føroyum. Brævið er siterað omanfyri.

Tann 10. juni 1802 kemur fyrsta skip, *Anne Marie,* úr Keypmannahavn við brævinum frá Rentukamarinum til føroysku myndugleikarnar.

14 - Eysturoyar kirkjubók (1816-32), 1817, Confirmerede piger
15 - Norðstreymoyar kirkjubók (1816-1832), 1817, Confirmerede Drenge
16 - Fútin, Inngangandi brøv og journalmál, 1802, Pro Memoria
17 - Jacobsen 2004:59
18 - Ordbog over det danske Sprog (á netinum)



## Hvør hevur skrivað greinarnar í *Dagen*?

Blaðstjóri á *Dagen* var K.H. Seidelin. Tað sigst um hann[19], at *„han helt tilhørte tidens frisindede retning.“* Fyrra greinin[20] er dagfest 27. juni 1806. Men í hesi grein er einki um koppavaccinu.

Seinna greinin var í *Dagen* 31. oktober 1806. Hon er skrivað í Havn tann 29. september 1806 og kann vera send niður við *Fredens Forsvar*, sum fór av Havnini tann 6. oktober. Tann fyrri parturin av greinini er um eina umfarssótt og byrjar soleiðis:

*„Forleden Sommer og Høst grasserede et slags smitsom Sygdom i Vestmanhavn og Waagø, hvoraf en del Mennesker døde.“*

Seinna helvt av greinini viðger eina aðra sjúku, og hvør ið fann upp á ráð at basa henni í Føroyum. Sjálvt um sjúkan ikki er nevnd, er hetta uttan iva pokur.

*Bemeldte Jacob Nolsöe har endnu vedligeholdt Vaxinazionen her i Landet, og den forplantes nu med Flid baade i Suderø og Waagø. Dette herlige Middel blev af hans Broder Kapt. Nolsöe, hidtil Landet bragt ifjor, og da, skjeedt med største Ulejlighed, sat i brug paa Naboøen og Thorshavn. Fire Gange var forhen forsøgt paa at bringe Vaxine-materien hertil paa Glas...* (Framhaldið við teimum fýra nøvnunum, Lund, Löbner, Egholm og Mörck, er endurgivið longur frammi í greinini)

## Poul P. Nolsöe hevur eisini vaccinerað

Leitingin í kirkjubókum gav eina óvæntaða hjáveiðu, sum vísir, at Poul P. Nolsöe sjálvur hevur luttikið í vaccinatión av ungfólki í 1805. Í kirkjubók[21] fyri Norderøe Præstegjæld 1817-32 finna vit hesar konfirmantar:

Jon Jacobsen, Arnefjord, 16 Aar 5 Mdr.
*„Den 1. December 1805 vaccineret af P. Nolsöe“*

Magnus Joensen, Mygledahl,
18 Aar den 18. Martii.
*„Den 1. December 1805 vaccineret af P. Nolsöe“*

Joen Frederik Henrichsen, 15 Aar, Arnefjord,
*„Den 1. December 1805 vaccineret af P. Nolsöe“*

Hetta er júst 3 mánaðir aftaná, at Poul P. Nolsöe kom til Føroya úr Keypmannahavn. Men seinni, serliga umleið 1814, hevur einkjan eftir Poul P. Nolsöe, Marin Malena Nolsöe, verið sera íðin at vaccinera fólk í Norðoyum.

Niðurstøða av hesi kanning um koppseting verður:

Tað er dokumenterað í kirkjubókum, at fleiri navngivnir persónar eru koppavaccineraðir í Føroyum í 1802-05. Neytakoppavaccinan má vera komin til landið í 1802 ella fyrr.

Tað er dokumenterað í Skansaprotokollini 1801, at ein persónur *"syg af Kopper"* kom við einum skipi á Havnina. Löbner, sum hevði læknakunnleika, var við sama skipi.

Bæði Leerbech, prestur, og J. Egholm, bóndi, høvdu verið uttanlands, og báðir hava vaccinerað børn í Føroyum, ávikavist í februar 1802 og í mai 1805.

Tað er ávíst, at Poul P. Nolsöe kom á Havnina 2. september 1805 og helst hevði vaccinu við tá. Poul P. Nolsöe hevur koppsett ungfólk í desember 1805.

Poul P. Nolsöe kann tí *ikki* vera tann fyrsti, sum førdi koppavaccinu til Føroya.

Tí er tað hugsandi, at bæði Leerbech, Egholm og møguliga Jomfrú Hammershaimb saman við Löbner hava ført koppavaccinu til Føroya, áðrenn Poul P. Nolsöe kom við sínari í september 1805.

**Keldur:**

Bonderup, G. (2001): *En kovending – koppevaccinationen og dens udfordringer til det danske samfund omkring 1800*. Aarhus Universitetsforlag. Aarhus.

Davidsen, J. (1984): Trý kasettubond. *Fyrilestrar um Poul P. Nolsøe.* Hildin á Fróðskaparsetrinum 22.9.1984. Tórshavn

Degn, A. (1929): *Oversigt over Fiskeriet og Monopolhandelen paa Færøerne 1709-1856*.
Felagið Varðin. Thorshavn.

Jacobsen, E.S. (2004): *Slóðir í Heilsuverkssøguni*. Føroya Fróðskaparfelag. Tórshavn.

Jakobsen, J. (1912/1966): *Poul Nolsøe – Lívssøga og irkingar.* HNJB. Tórshavn

ODS. Ordbog over det danske Sprod. https://ordnet.dk/ods

Olsen, Ó. (2016): *Nólsoyar Páll – siglingarmaður og skald.* Forlagið Kjølur. Argir

Skydsgaard, M.A (2014): Store opdagelser: Kokopper og vaccination. *Videnskab.dk* <download 9.1.2018>

**Óprentað skjøl:**

Andersen, J. Brandt (2018): Mail ang. koppevaccionation omkr. 1800. Dato: 6. aug 2018

Claus Lund Dagbók, Handrit. Føroya Landsbókasavn

Dagen <internet: www2.statsbiblioteket.dk/mediastream/avis/record>

Dansk Demografisk Database, DDD (Rigsarkivet) < internet>

Eysturoyar kirkjubók, Landsskjalasavnið <History.fo>

Fútin. Inngangandi brøv og journalmál, 1790-1825. Landsskjalasavnið

K.H.Seidelin. <https://da.wikipedia.org/K.H.Seidelin>

Norðstreymoyar kirkjubók. Landsskjalasavnið <History.fo>

Norðoya kirkjubók. Landsskjalasavnið <History.fo>

Skansajournalin, fleri ár. Landsskjalasavnið. <History.fo>

19 - K.H.Seidelin
20 - Dagen, 27. juni 1806. Endurgivin sum facsimile hjá Olsen 2016:58-60
21 - Norðoya kirkjubók (1817-32) [2], Konfirmerede Drenge, Waaj Kirke, 11. Maj 1817

GREIN 1/2

## Føroyskar sálnaskráir 1759-1785

# ØLL DUGA AT LESA Í BÓK

Fremst stóð hin 20 ára gamla Sophia Christiana av Nesi. Hon hevði eisini hægstu karakterir av øllum børnum og ungum har í sóknini, optime í bæði bókalestri og Luthers katekismus, b.b. í Pontoppidans forkláring. Teir sjey Dávids-sálmarnar dugdi hon allar, konfirmerað var hon, og um hennara levnað var bara eitt at siga: optime. Tá ið Christen Diurhuus, próstur, hin 18. oktober 1759 setti sína undirskrift undir ta fyrstu føroysku sálnaskránna, frøddi tað hann at kunna seta eina av teimum gentunum fremst, sum tað veruliga glógvaði í: sína egnu dóttur Sophia Christiana Djurhuus.



**Jákup Reinert Hansen**
jakuprh@setur.fo
Ph.D., lektari í kirkjusøgu
Fróðskaparsetur Føroya

Føroyar høvdu fingið nýggjan biskup og nýggjan próst mestsum í senn. Í 1757 hevði Ludvig Harboe sett seg í Sælands bispastól, og í 1758 tók Christen Djurhuus við sum Føroya próstur, eftir at meirilutin av teimum føroysku prestunum høvdu víst á hann sum eftirmann hjá Michel Arrhøboe á Sandi. Teir báðir kirkjuligu leiðararnir skuldu sum skjótast finna eitt arbeiðslag, og tí skrivar Harboe til Djurhuus 24. apríl 1759 og biður hann senda sær upplýsingar niður. Tað harmar biskup, at hann ikki sjálvur kann koma til Føroya at kunna seg um, hvussu kirkjuliðunum og teimum ungu veit við. Tí leingist honum eftir at fáa eina gjølliga frágreiðing frá tænastuferðunum hjá prósti.

Í sambandi við vitjanirnar hjá prósti, tann sokallaða visitatsin, biður Harboe á fyrsta sinni um sálnaskráir:

„Det er her Praxis i Stiftet, naar enten Prousten eller Biscopen kommer at visitera paa et Stæd, at hannem da leveres et Register over Menighedens Ungdom, deres Navne, Alder, Profect [*framgongd*] og Forhold."

Yvirlitið yvir allar sálirnar – t.e. yvir allan ógiftan ungdóm millum 6 og 30 ár – hóskar sum kirkjuligt tiltak væl til pietismuna, tað andaliga rákið, sum ráddi í ríkinum langt inn í 18. øld. Konfirmatiónin var innførd í 1736 sum almenn skylda. Í 1737 hevði kirkjan fingið eina nýggja læribók, frágreiðingina hjá Erik Pontoppidan til Luthers lítlu katekismus. Ein lóg um bygdaskúlar og undirvísingarskyldu var eisini komin í 1737 fyri Danmark og í 1739 fyri Noreg. Tað galt um at tryggja tí uppvaksandi ættarliðinum bókligan lærdóm, men eisini persónligan og andaligan vøkstur.

### Lesing og katekismus

Í sálnaskránni, sum próstur í 1759 gjørdi fyri sítt egna prestagjald, Eysturoy, eru tilsamans 404 ung fólk, og av teimum eru 152 konfirmerað. Hvat skuldu tey ungu duga?

Lærugreinar og undirvísingartilfar vóru lagað eftir hesum báðum: lærdómi og vøkstri í tí evangeliskt luthersku trúnni. ABC-irnar, sum vóru nýttar í 18 øld, byrjaðu við bókstavunum og einføldum stavilsum : Ab, eb, ib, ob, ub o.s.fr. Fyrsti tekstur, tey smáu síðani lærdu at lesa, var Faðirvár. So kom trúarjáttanin, tey tíggju boðini, dópsboðini, innsetingarorðini til altargongd, borðbønir, morgun- og kvøldbønir og at enda ein lítil barnabøn.

Taka vit Nes sókn sum dømi, so vísir fyrsti teigur eftir navn og aldur, hvussu til stendur við „Boglæsning." Lesiførleikin verður vístur við hesum orðum: „0, abc, staver, lidt, saa hen (*so dánt*), noget, maadelig, vel, optime."

Næsti teigur skal vísa, hvussu langt børnini og tey ungu eru komin í Luthers lítlu katekismus. Nú møta tey somu tekstum sum í ABC-ini, men við frágreiðingini hjá Martin Luther aftrat. Duga tey ikki meginpartin av allari bókini ella harútímóti, stendur í sálnaskránni, hvussu langt tey eru komin: nøkur boð, faðirvár, nakrar partar.

Áðrenn konfirmatiónin var innførd í 1736, hevði bókalestur ikki verið so vanligur, greiðir próst



**Mynd 1.**
Dømi úr sálnaskrá hjá C. Djurhuus, prósti, í 1761.
*Landsskjalasavnið*

Djurhuus biskupinum frá í skrivi 14. sept. 1759. Tey ungu plagdu at sleppa til altars, tá ið tey dugdu Luthers katekismus. Hetta var tá eisini beint eftir Norsku lóg: "De skulle ikke tilstæde de Unge at komme til Sacramentet, førend de have vel fattet deres Børnelærdom, at finde deraf den rette Meening i Hiertet, og derhos hvorledes de skulle bekiende sig for Præsten, og vide at svare til Lutheri smaa Spørsmaal om sligt."

**Mynd 2.**
Erik Pontoppidan: Frágreiðing til Luthers katekismus.


Sandhed Til Gudfrygtighed, Udi En eenfoldig og efter Mulighed kort, dog tilstrekkelig Forklaring Over Sal. Doct. Mort. Luthers Liden Catechismo, Indeholdende alt det, som den, der vil blive salig, har behov, at vide og giøre. Paa Kongel. allernaadigste Befalning. Til almindelig Brug.
imprimatur.
C.L. LETH.
Selges her uindbunden for 8. ß. Danske.
KIØBENHAVN,
Udi det Kongel. Wäysenhuses Bogtrykkerie, og paa dets Forlag,
Trykt af Gottmann Friderich Kisel.
Aar 1749.

## Pontoppidans *Sandhed til Gudfrygtighed*

Tann víðkaða frágreiðingin til Luthers lítlu katekismus, sum Erik Pontoppidan gevur út í 1737, er ikki nevnd í fyriskipanini um konfirmatión, sum kom árið fyri. Men hon er skrivað eftir kongsins boðum og skal nú brúkast í bæði Danmarkar og Noregs ríki. Henda bók krevur munandi meira av teimum ungu.

Við spurningum og svarum skal ein tryggja sær, at øll katekisman er skilt væl og virðiliga. Longu í innganginum síggja vit, hvat aðalmálið er hjá Pontoppidan:

**1.** Kiære Barn, vil du ikke gierne være lykkelig paa Jorden, og salig i Himmelen? – Jo, kunde jeg ikkun blive det.
**2.** Vil du da vel gaa den Vey, som fører dig til dette Maal? - Ja, dersom jeg kand finde den.
**3.** Troer du ikke, der er en Gud til? – Jo, thi Verden kand umuelig have skabt sig selv, men maa have en Aarsag ældre og høyere end alle ting, hvilket evige Væsen kaldes Gud.
**4.** Hvorved viser Gud dig og mig denne Vey? – Ved sit Ord.

Hetta er sett upp sum ein samrøða, sum hevur ta fortreyt, at barnið fegið vil ogna sær ta ævigu sæluna, og at tann, sum undirvísir, vil leiða tað tann rætta vegin: inn í Guðs orð og kirkjunnar læru. Tað tekur eina løtu at koma ígjøgnum teir 759 spurningarnar. Kortini er ein lítil triðingur av innihaldinum merktur við striku í marguni. Hetta nýtist teimum tornæmu ikki at duga uttanat, men bara at lesa og hugsa um.

Í Eysturoyar prestagjaldi vísir yvirlitið frá 1759 tá eisini, at bara tey fæstu av teimum, sum eru konfirmerað, duga alla Pontoppidan. Nógv duga meginpartin, men summi nakað og summi lítið.

### Sjey serstakir Dávids-sálmar

Seinasta lærigrein er teir sjey poenitentse- ella bótarsálmarnir hjá Dávidi kongi: Sl. 6, 32, 38, 51, 102, 130 og 143. Prestadóttirin dugdi teir allar, og tað dugdu tilsaman 14 av teimum 59 ungu í Nes sókn, meðan 34 ongan dugdi, og hini lógu harímillum.

Sambært fyriskipanini frá 1736 byrjar konfirmatiónin við yvirhoyring. Prestur hevur tá trý evni í at velja: 1. Hann kann taka teir fimm høvuðspartarnar í tí luthersku læruni. Her hóskar tann lítla katekisman væl. 2. Hann kann eisini fáa greiði á vegnum til sælu, sum er: skapanin, syndafallið, frelsan í Jesusi Kristi, Heilagi Andin, umvending og trúgv, tað nýggja lívið, ævinleikin. Pontoppidan tekur saman um tann sælugerandi sannleikan í 42 setningum. 3. Men tað hóskar eisini væl at leggja dent á bótina ella pønitense, sum tey søgdu tá. Angur um syndina, longsil eftir fyrigeving, bøn um Guðs náði, friður í hjartanum – hetta var tað, sum Dávid kongur hevði sungið so inniliga um í sínum sjey sálmum.

Teir sjey sálmarnir stóðu aftast í Kingobók. Og tað vóru stórt sæð bara tær bøkur, ið her eru nevndar til kirkjuliga nýtslu, sum um hetta mundið stóðu á hillunum í handlinum í Havn: ABC, Luthers lítla Katekismus, Pontoppidan, Sálmabókin - og so einstakar lestrabøkur og álmanakkar.

### Yvirhøvur skikkilig børn

Uttast til høgru kemur so tann teigurin, sum skal vísa „Stand og Forhold." Nú kennir Djurhuus jú øll børn í sóknini, so hann finnur eitt lýsingarorð at hefta upp á hvønn teirra: „godt nemme, dorsk, egenrådig, vild, hastigsindt, stivsindt, stille, stoltagtig, villig, fortrædelig, sømmelig, skikkelig, blødagtig, dybsindig, barnlig, dosmerhoved, smuk, tro, rosværdig o.s.fr." Dóttir hansara er tíbetur ikki tað einasta, sum skarar framúr. Í Sjóvar sókn er t.d. hin 25 ára gamla Zidsel Joensdatter, sum fær optime í øllum og ta viðmerking uttast til høgru, at hon „lærer andre".

Næstu ferð, sálnaskráirnar verða útfyltar, eru tær eftir leiðbeining frá Harboe, biskupi, gjørdar meira einsháttaðar, og tá fáa næstan øll tey ungu sama skoðsmál: "Skikkelig". Afturfyri tekur próstur gjarna samanum, tá ið hann hevur verið í eini kirkju og visiterað, og leggur nøkur orð aftrat. Tá vísir sálnaskráin ikki bara tað, sum prestur metir um hvønn einstakan og hennara ella hansara evni, men eisini ta fatan, sum próstur situr eftir við.



**Mynd 3.** Tíðarmynd av Kjalnesgarði í Kollafirði í 18. øld.
*Mynd: Dayes*

## UM **SÁLNASKRÁIR**

Sálnaskrá er ein týðing av tí danska orðinum sjæleregister. Ein sálnaskrá er eitt yvirlit yvir øll børn og ung, ógift fólk í einum kirkjuliði millum 6 og 30 ár. Skráin vísir lesiførleikar og kristiligan lærdóm. Prestarnir gjørdu hetta yvirlitið og handaðu prósti ella biskupi tað, tá ið teir komu at vitja kirkjuliðini.

Í Íslandi byrjaðu sálnaskráirnar í 1746, men tær eru bara varðveittar frá 9 sóknum.

Í Noregi eru tvey sløg av sálnaskráum. Í tí fyrru verða øll, sum hoyra til eitt húski, tikin við: foreldur, børn, gomul fólk, húskallar og arbeiðskonur. Tað seinna slagið er einfaldari og telur bara børn, ung, ógift og tænastufólk. Flestu sálnaskráir byrja í 1730-árunum og enda um 1800, tá ið fólkateljingarnar byrjaðu. Í Noregi eru tey komin fram á umleið 140 sálnaskráir.

Úr Danmark er lítið at frætta um sálnaskráir. Sælands biskupur Peder Hersleb gav prestunum boð um at gera hesar skráir á fundi í 1738, og boðini standa at lesa í fleiri kalsbókum, men bert fáar skráir eru varðveittar.

Í Svøríki verða sálnaskráir kallaðar husförhörslängder. Tær byrja summastaðni longu seinast í 1600-talinum og gerast vanligar mitt í 1700-talinum. Hesi yvirlit hava so umfatandi upplýsingar um hvønn einstakan, at tey eru at samanbera við kirkjubøkur. Veruligar kirkjubøkur koma í teirra stað í 1895.

Úr Føroyum eiga vit sálnaskráir úr øllum teimum sjey prestagjøldunum frá 1759-1785. Samanborið við onnur Norðurlond má hetta tilfarið sigast at vera ein sjáldsama fullkomin heild.

Upprunaskjølini eru á Ríkisarkivinum undir Sjællands Stifts Bispearkiv B 3 CL, Indkomne sager, Færøerne, div. år 1729-1762. Fotokopi eru í lesistovuni á Landsskjalasavninum.

Lógir, konfirmatiónini viðvíkjandi, sum vóru galdandi tá, vóru „Forordning ang. den tilvoxende Ungdoms Confirmation og Bekræftelse i deres Daabes Naade af 13. Januar 1736," „Rescript (til Biskopen i Sjelland), ang. endnu 3 Søndage til Confirmationen, naar de fastsatte ei ere nok af 6. April 1736," og „Forordning ang. i hvad Alder Ungdommen maae antages til Confirmation af 25. Maj 1759."

Gjøgnum 18. og 19. øld vórðu støðugt fleiri borgarlig rættindi knýtt at konfirmatiónini. Tann, sum var konfirmeraður, kundi verða trúlovaður og giftur, festa, keypa fasta ogn og gera hertænastu. Eingi serstøk borgarlig rættindi ella skyldur verða tó nevnd í 1700-tals lógunum um konfirmatión.

GREIN 2/2

Føroyskar sálnaskráir 1759-1785

# Á FERÐ UM PRÓSTADØMI FØROYA

Próstur vitjaði ein triðing av øllum teimum 39 kirkjunum á hvørjum ári, so tað skuldi eydnast honum at røkka allan vegin runt eftir trimum árum. Størsta hending, tá ið kirkjan soleiðis fekk fína vitjan, var helst tann løta, tá ið próstur við sálnaskránni frá presti teirra í hondini yvirhoyrdi børn og ung. Alt varð uppteknað, og vit fáa nógv at vita um lesiførleikar og trúarlív, men eisini um nógv onnur viðurskifti, um vit í huganum gera eina ferð saman við honum. Prestagjøldini eru ymisk, og tað eru prestarnir eisini.



**Jákup Reinert Hansen**
jakuprh@setur.fo
Ph.D., lektari í kirkjusøgu
Fróðskaparsetur Føroya

## Hin gamli presturin í Norðuroyggjum

Í Norðuroyggjum rósar Djurhuus í 1762 tí arbeiði, sum hin 81 ára gamli Clemen Færøe, prestur og fyrrverandi próstur, hevur gjørt: "Besøgte alle ovenanmeldte 7 sognes kirker og i dennem overhørte foranmeldte ungdom i boglæsning, Lutheri Catechismo, Pontoppidans Spørgsmaalsbog, Aandelige hellige sange og psalmer samt udi Theologia Characteristica, befandt jeg samme ungdoms hellige forfremmelse at være, ligesom vor kiere, Ære-Provst Hr. Clemen Færøe, foran vidnet og meldt haver, hvorfor Gud være ære og priis i evighed."

Færøe hevur tó ikki viðmerkt, hvørji eru konfirmerað. Í 1760 hevur hann fingið Albert Matras aftrat sær sum hjálparprest, og tá ið Matras í 1764 skrivar sálnaskránna, gongur sjón fyri søgn: Konfirmantarnir í Norðuroyggjum eru rættiliga tilkomnir! Bara nøkur heilt fá undir 20 ára aldur eru konfirmerað. Ein nýggj reglugerð er annars komin í 1759 – send av himli í tøkum tíma, heldur Djurhuus. Hon ásetir, at yngsta mark fyri at verða konfirmeraður er 14 ár, og evsta mark er 19 ár. Matras kemur til við nýggjum kreftum, og av sálnaskrá hansara frá 1770 sæst, at nú eru øll yvir 15 ár konfirmerað.

## Samfelagslýsing úr Norðurstreymoy

Í Norðurstreymoy hevur Oluf Vang, prestur, longu í 1759 gjørt sær ómak at greiða frá samfelagsviðurskiftum. Hann ger viðmerking um summi, sum eru tænastufólk, fátæk, sjúk ella nýliga flutt í prestagjaldið. Próstur leggur aftrat, at dúgliga verður royndt at læra tey ungu, men hann fýlist á, at tað betra fólkið heldur seg burturi frá visitatsi, tá ið tey annars kundu verið eitt fyridømi:

„Udi dette register gaaer man ej til den alder, som er over 25 aar. Dog mig er berettet, at ugifte Personer til 30 aar exclusive plejer at være anseete pligtige at fremkomme her i landet til Visitatsen efter gammel praxis; men de, som synes at have et præ for andre i formue og et slags værdighed [*halda seg standa yvir øðrum*], holde sig for gode til at komme i Visitats; dog synes det, at ordinaire ugifte tienestefolk af 30 aar og derunder maatte vel komme frem i Visitatsen, sampt ordinaire folkes u-gifte børn af 30 aar, og derunder, som kunde komme; men Præstens samt med Kongl. Bestallingers brev beværdigende Personers, og andre af et slags dignitet fra det almindelige distingverede Personer kunde vel, hvad Færøe angaaer, lade deres børn fra 6 til 18 aar gamle indkomme, naar Visitats holdtes saadan steds; holdte de længere ved dermed, var det et stærkt tilskyndende exempel for de nedrigere."




**Mynd 4.** Úr týskari ABC



**Mynd 5.** Undirskriftin hjá Christen Djurhuus, prósti

## Í Vágum duga øll at lesa

Vestur í Vága prestagjald fer Djurhuus altíð við gleði, tí har eru børnini og tey ungu millum tey fremstu í landinum. Í sálnaskránni, sum Hans Svabonius, prestur, ger fyri Miðvág í 1759, eru 13, sum eru millum 15 og 29 ár og konfirmerað, 4 16-19 ára gomul eru ikki konfirmerað enn. Hini, sum eru upp til 14 ár, duga katekismuna og partar av Pontoppidan so væl, sum væntast kann eftir teirra aldri, og øll kunnu lesa innan í bók. Í Sandavági eru 11 konfirmerað, 3 sum nærkast, og øll undir 14 duga at lesa. Í Sørvági eru 11 konfirmerað, og øll onnur duga at lesa svarandi til teirra aldur. Í Bø eru 13 konfirmerað, eitt undantak er – sum fær átalu og lovar bata – og øll tey yngru duga at lesa. Í Mikinesi eru 5 konfirmerað, og øll hini duga at lesa og eru farin í holt við katekismuna.

Væl líkar prósti, tí hann setir altíð nøkur rósandi orð undir. Í 1759 skrivar hann: „…at ungdommen i dette Præstegield er jævnt over alt næsten den beste ungdom, det kommer deels af Sogne-Præstens fliid, hvilcken og kand findes hos andre Præster her i landet, deels deraf, at ungdommen er liden i dette Præstegield, og folket der staaer sig icke ilde.“ Í 1763 er hann ikki minni hugtikin: „Da jeg besøgte i Sommer disse Kirker, befandt jeg ungdommen ved dem saa gode, at jeg vilde ønske, at alle Sogne her i landet kunde blive saa gode som disse.“

## Á rættina heldur enn í kirkju

Suðurstreymoyar prestagjald er nakað fyri seg. Í Havnar kirkju heldur próstur seg noyðast at halda visitats á hvørjum ári. Í 1761 eru hjá Johan Henric Weyhe, presti, 121 børn og ung, og 51 eru konfirmerað. Men próstavitjanin, sum var 14. mars, Boðanardag Mariu, avdúkaði fleiri veikleikar. Hin 25 ára gamli Stephan Danielsen og hin 28 ára gamli Morten Olessen høvdu ikki virt dagsins heilagleika og vóru farnir á rættina í einum bygdalagi einar 5-6 fjórðingar frá Havnini eftir seyði. Teir komu aftur um kvøldið og kundu vænta sær at verða revsaðir av øvrigheitini.

Visitatsin fór fram seinnapart á degi, so hon veruliga kundi vera ein stórhending fyri kirkjulíðið; men próstur saknaði ov nógv fólk í kirkjuni – ikki at tað var nakað nýtt í Havn. Tá ið fleiri av teimum, sum áttu at verið eitt gott fyridømi, hildu seg burtur, gleddi tað Djurhuus tess meira at síggja Morrath, kommandant, við øllum sínum húsi. Tey vóru trúgv kirkjufólk og høvdu eisini hesa ferð latið seg uppbyggja av tí heilagu hending í Guðs húsi. Eisini tvær døtrar hjá fútanum komu fram til yvirhoyring. Tað mundu vera tær báðar Annike og Friderica Lovise Hammershaimb, sum eisini møttu upp í 1760. Slíkt fær próstin at leggja eina bøn aftrat: „Gud den barnhiertige Fader give megen naade, kraft, fliid og Velsignelse baade dem, som forfremmer, og dem, som skal forfremmes, i kirken, til ald naade og salighed i Christo Jesu den søde frelser-mand!“

## Hin fátæki danski skúlin í Havn

Umframt latínskúlan er eisini ein lítil, danskur skúli í Havn, og eisini her vitjar próstur á hvørjum ári til tess at kunna seg um skúlagongdina og hennara úrslit. Hann er ikki imponeraður! Hin fátæki rektarin fyri latínskúlan letur Poul Isachsen fáa 16 gyllin í ársløn fyri at halda danskan skúlan við børnum millum 5 og 16 ár, og møguliga fær lærarin „en liden gram extra-løn“, tá ið hann er heima hjá teimum ríku Hammershaimb-hjúnunum og undirvísir børnum teirra. Í 1762 hevur Poul Isachsen 11 gentur og 11 dreingir í skúla, og tað, sum tey lesa, er ABC, Katekismus og Pontoppidan. Djurhuus plagar at meta um førleikarnar við hesum stiga:

**Optime:** framúrskarandi
**Bene:** gott
**Mediocriter:** miðal
**Male:** vánaligt
**Parum:** ónøktandi

Meðan hann hoyrir børnini í tí, lærarin sigur tey duga, setir prósturin sín karakter á blaðið. 12 fáa parum, 4 fáa male, 2 mediocriter og 4 fáa bene. Eingin fær hægsta karakter. Ella sagt við reinum orðum:

„Disse børns forfremmelse, da jeg den 2 Julj =62 overhørte dem, syntes mig liden i de angivne ting, men reent alle u-vidende i skriftlæsning, skrivning og den nyttige regne-konst befandtes, saa samme skole synes mig af liden Værdie, siden den formedelst forældrene er ej vel funderet og belønnet.“ Tann danski skúlin er eitt hjartamál bæði hjá prósti og biskupi; men tann fíggjarliga orkan ógvuliga avmarkað.

## Sjúka og klandur í Sandoyar prestagjaldi

Úr Sandoyar prestagjaldi er næstan bara gott at siga. Øll læra tað, tey skulu, tey verða konfirmerað, og tey skikka sær væl. Tey fáu, sum fáa nakrar viðmerkingar í uttasta teigi til høgru, eru tey, sum hava eitthvørt likamsbrek. Á Sandi eru fýra í 1761. Jacob Clemendsen, 20 ára gamalur, er konfirmeraður; men um hann skrivar Eisenberg: "Denne kan næsten intet tale, og altså intet læse, men noget modtage af langsomme ord. Har dog en ganske sund fornuft og forholder sig skikkelig i sit levnet." Hini trý, sum øll eru sjónveik og at enda gerast blind, hava øll sama eftirnavn og munnu vera systkin. Í 1771 sæst, at bæði Ole og Peder Rasmussen eru konfirmeraðir, hóast teir ikki síggja at lesa. Luthers katekismus duga teir alla og úr Pontoppidan „det nødvendigste“. Í 1781 stendur hin nú 29 ára gamla Birgitha Rasmusdatter ovast á sálnaskránni. Konfirmerað er hon, hóast hon „kand slet intet see at læse i bog,“ men lýkur treytirnar fyri at verða konfirmerað. Undir Lutheri Catechismus stendur „heel“ og undir Pontoppidans Forklaring stendur „skikkelig.“

Próstur heldur kanska, at prestur í sínum fyrsta yvirliti í 1761 tekur í so rívan til, tí hann tekur samanum við hesum orðum:

„Ved Visitatsen in Junio aaret 1761 befandt jeg Ungdommen i Sandøe kald nogenlunde god, men ej bedre end ovenfor findes; udi Skuøe blev klaget over et forargeligt U-forlig imellem et par ægtefolk.“

## Armóð í Suðuroy

Suðuri í Hvalba ger Haldansen, prestur, tað, hann er mentur, men tungt heldur hann tað vera at skriva sína sálnaskrá í juni 1769. Tann størra helvtin, eisini fleiri, sum eru 20 ár ella eldri, eru framvegis ikki konfirmerað. Í Øravík hevur hann biðið sýslumannin lesa við teimum ungu, í Sumba hevur hann yvirtalað kirkjuverjan Daniel Niclasen til at yvirhoyra tey hvønn sunnudag eftir guðstænastuna, og eisini í Fámjin ganga tey trúliga inn á gólvið hjá kirkjuverjunum at verða yvirhoyrd. Ringast letur Haldansen at Froðbiar sókn:

„Ungdommen i denne Menighed, nogle faa lærevillige undtagen, har altid været den sletteste baade til læsning og kundskab, og det fra mit Embeds første tiltrædelse [í 1757]. Ungdommen i Bygdelaget Frodebøe kommer altid til Kirken og Catechisationen, naar Gudstienesten holdes, og deres forfremmelse efter Alderen er nogenlunde baade i læsning og uden ad. Ørdevigs ungdom har jeg formaaet Sysselmanden til at overhøre hver Søndag, og de kommer jævnlig til Catechisation i Famøen. Men Trungisvaais ungdom er gandske vanslægtende. I min tiid har intet barn derfra været til Confirmation.“

Tað er áhugavert at síggja, at próstur í síni viðmerking ber í bøtuflaka fyri hesi neyðars fólk:

„Det, der er antegnet i Frodebøes Sogn om Trangisvaags ungdom af Sogne-Præsten her oven for, er saa at forstaae, at de unge dér lidt lærer i deres unge aar og, naar de ældes noget, sættes de i tieneste hos andre, som besørger deres anførelse i den Christelige lærdom; thi de faa folk i Trangisvaag boende ere sær lade og fattige; hvilke lovede mig forbedring.“

## Sálnaskráin sum kirkjuligt amboð og søgulig kelda

Hvørja nyttu gjørdu hesar sálnaskráirnar sum eitt kirkjuligt amboð? Tær góvu prestunum høvi til at tekna øll børn og ung fólk upp, so teir høvdu eitt veruligt yvirlit yvir tey. Í 18 øld. var skúlagongdin framvegis stórt sæð heimalestur. Men við sálnaskráunum kundi prestur fylgja við bæði lesiførleika og vanligum kunnleika um tað, kirkjan helt hava størstan týdning: barnalærdómin í Luthers lítlu katekismus og frágreiðingini hjá Pontoppidan. Sálnaskráirnar eru helst tann søguliga kelda, sum greiðast vísir okkum, hvør dugur var í heimalestrinum í 18. øld.

Sum frá leið, gjørdist konfirmatiónin í størri og størri mun markið millum at vera barn og vaksin, bæði í fólksligari fatan og hjá myndugleikunum. Fleiri og fleiri borgarlig rættindi komu at verða treytað av, at ein var konfirmeraður. Sæð við kirkjuligum eygum var ætlanin við próstavitjan og sálnaskrá tó ein onnur: at sannføra kirkjufólkið um, at ein eisini eftir konfirmatiónina átti at koma í kirkju og ganga fram bæði í lærdómi og trúgv.

Sum Harboe biskupur skrivaði í áðurnevnda brævi til Djurhuus, kundi próstur við sálnaskránni í hond finna høvi til at geva bæði rís og rós. Um visitatsin í Kaldbak 15. mai 1760 skrivar Christen Djurhuus: „Tvende af dem overhørte jeg med sær stor fornøyelse; de fleestes af de andres fliid fandtes ingen berømmelse værd, dog giorte de mig løfter til forbedring... eet iblant dem kunde intet i bog; jeg sagde til denne samme: lær du endnu, dog du er 24 aar gammel; thi ingen er for gammel godt at lære.“ Og tá ið hann 25. mars 1760 hevur verið í Nólsoyar kirkju, ivast hann onga løtu:

„Samme ungdom havde kiendelig forbedret sig i Herrens kundskab siden næstafvigte aar, hvoraf man seer en opbyggelig nytte i de introducerede Siele-Registere.“

Og biskupur, sum ikki sjálvur kom til Føroya, takkaði prósti fyri tað stóra arbeiði, sum her varð skjalprógvað, og goymdi allar tær føroysku sálnaskráirnar.



**Mynd 6.** Prestagarðurin í Todnesi Heima á Sandi.
*Tekning: J. P. Gregoriussen*

Tilfarið má sigast at vera fullkomið. Allar føroyskar bygdir eru her lýstar við sínum børnum og ungu fólkum. Sum hesi fáu dømi vísa, er her nógv at finna, antin ein so hevur áhuga fyri ættargransking, kirkjusøgu, lesiførleika og skúlasøgu, heilsustøðu ella samfelagsligum viðurskiftum. Hesi skjøl halda fram at koma úr Føroyum líka til 1785, langt eftir at Djurhuus er deyður í 1775 og eini tvey ár eftir tað, at eisini Harboe í 1783 er farin foldum frá.

## Tíðirnar broytast

Sálnaskráin og tann kirkjuliga uppalingin í 18. øld, sum her verða so væl lýstar, forða ikki fyri, at tíðirnar broytast, og nýggj rák koma inn yvir oyggjarnar. Pietisman má víkja fyri upplýsingartíð og rationalismu, og tað hóvar ikki Christen Djurhuus. Í sálnaskránni fyri Eysturoyar prestagjald 1770 suffar hann so hjartaliga um alt tað verðsliga, sum nú dregur hug og hjarta frá Guðs orði:

„Denne Ungdom er ey befunden i grove laster, har udviist til dyd og Christendom lyst og stræben. Da dog ofte de unge og mange ældre hindres fra Guds ord og dets øvelser ved den u-gudelige yppighed i sprog, konster, nye opfindelser, klædedragter, vellyst og deslige, hvilcke saa drage mennskens hierter til sig, ald kraft og attention [*uppmerksemi*], som ere hos de dertil ilde hengivne arme trælle og forgabede stacklere, saa de har neppe en time, ja icke engang i kirken under Guds ords tieneste et Minut at drages fra onde Courieuse tanker og omvendes i sandhed til en ret gudelig eftertanke til aandelig frugt og fordeel; jeg meener dermed ey alle, men de fleeste; dog mærker mand, at en stor Mechanicus har fleere Tilskuere og Libhabere end en Doctor Theologiæ, der forkynder i sandhed Herrens ord."


**Keldur til báðar greinarnar:**

ABC, Kjøbenhavn 1731.

Andersen, F.: "Sjællands stifts præstearkiver." Personalhistorisk tidsskrift 99. årgang, 1979.

Appel, C. og Fink-Jensen, M: Da læreren holdt skole. Tiden før 1780. Dansk skolehistorie 1. Aarhus Universitetsforlag 2013.

Bratland, K.: Sjeleregister. https://www.arkivverket.no/slektsgranskning/sjeleregister (9/10-2018)

Fogtman, L.: Samling af alle gieldende Forordninger, Rescripter, Resolutioner og Collegialbreve for begge Rigerne samt de Steder af Danske og Norske Lov, saavelsom Kirke-Ritualen, der angaae Religionen, Geistligheden, Kirker, Skoler, Hospitaler og Fattige, samt Bøger og Almanakker. Kiøbenhavn 1784.

Imsen, S., og Winge, H.: Norsk historisk leksikon. Kultur og samfunn ca. 1500-ca. 1800. 2. utgave. Cappelen Akademisk Forlag 2003.

Markussen, I: "Konfirmationsforordningen af 1736." Uddannelseshistorie 1986. 20. årbog fra Selskabet for Dansk Skolehistorie.

Markussen, I: "Skole og undervisning som del af den evangelisk-lutherske opdragelse i 1700-tallet."

Gregersen, N. H. og Bach-Nielsen, C. (ed.): Reformationen i dansk kirke og kultur. Bind 2, 1700-1914. Syddansk Univeristetsforlag 2017.

Nolsøe, Lena: "Sjæleregister". Nørr, E. og Thomassen, J. (ed.): Nordatlanten og Troperne. Forvaltningshistoriske kilder fra Færøerne, Grønland, Island og Tropekolonierne. Selskabet for Udgivelse af Kilder til Dansk Historie. København 2007.

Pontoppidan, E.: Sandhed til Gudfrygtighed, Udi En eenfoldig og efter Muelighed kort, dog tilstrekkelig Forklaring Over Sal. Doct. Mort. Luthers Liden Catechismo. Det Kongel. Vaysenhuses Bogtrykkerie. Kjøbenhavn 1749.

Øssursson, J.: Føroya biskupa-, prósta- og prestatal. Tórshavn 1963.

Á Landsskjalasavninum:
Sálnaskráir 1759-1785.
Indkomne Breve, Færøernes provsti.
Stiftsamtmaðurin: Protokol for Færøe 1721ff.

Á Ríkisarkivinum í Keypmannahavn:
Sjællands Stifts Bispearkiv B 3 CL, Indkomne sager, Færøerne, div. år 1729-1762.



# TÁ ROTTAN VARÐ SLEPT Í KUNOYNNA

Tað var í 1914, og tað var NN, sum slepti rottuni í oynna. Hesa søguna eru tað fleiri, sum hava fortalt mær, men øll leggja tey eina við, at eg ikki má siga, at tað eru tey, sum hava fortalt mær søguna. Og tað geri eg heldur ikki.




**Eyðfinn Magnussen**
EydfinnM@setur.fo

Lektari í lívfrøði,
Náttúruvísindadeildin,
Fróðskaparsetur Føroya


Rottan, sum í dag livir í Føroyum, er brúna rottan *(Rattus norvegicus)*. Brúna rottan er lutfalsliga nýggj í Føroyum. Hon kom higar í 1768. Áðrenn tað hevði svarta rottan *(Rattus rattus)* verið her, men brúna rottan tók yvir, og svarta rottan hvarv.

Søgan um brúnu rottuna í Føroyum byrjar við einum skipsvraki, sum rak á land í Hvalba. Hetta var í mai í 1768. Talan var um norska skipið „Kongen af Preussen", sum, ávegis frá Tróndheimi til Dublin í Írlandi, rendi á land á skotsku oynni Lewis. Vrakið, sum var fult av rottum, rak til Føroya og kom á land í Hvalba. Við hesum vrakinum komu fyrstu brúnu rotturnar til Føroya. Rottan spjaddist skjótt kring landið. Longu eftir einum ári vóru tær um alla Suðuroynna. Í 1769 vóru tær sæddar í Havn, og eftir einans tíggju árum vóru tær komnar til norðurendan á Streymoynni, til bygdirnar Víkar og Saksunar. Í 1776 komu tær til Eiðis og høvdu longu trý ár seinni spjatt seg um alla Eysturoynna. Í 1779 komu tær til Sørvágs, og árið eftir vóru tær eisini í Miðvági.

## Útbreiðslan í Norðoyggjum

Til Norðoyggjar kom brúna rottan ikki fyrr enn eini 120 ár eftir, at hon var var komin til Suðuroynna, haðani hon spjaddi seg til hinar stóru oyggjarnar. Rottan kom til Norðoyggjar umleið ár 1900. Hagar kom hon við norðmonnum, sum høvdu hvalastøð í Norðdepli á Borðoynni. Hendan hvalastøðin var á Kópagørðum, sum er einar 200 m norðanfyri, har byrgingin í dag er um Hvannasund. Frá hvalastøðini fór rottan yvir um sundið og kom til Viðareiðis einaferð millum 1904 og 1910. Nú var rottan sostatt komin til seks av teimum 18 oyggjunum í Føroyum.

Síðani gingu tað eini 15 ár, til brúna rottan kom í Kunoynna. Tað var í 1914. Tað sigst, at fólk hava slept rottuni í Kunoynna við vilja. Eg havi fingið hesa søguna fortalda frá fimm ymiskum fólkum, sum øll hava tilknýti til Kunoynna, men øll ynskja tey tó at vera ónevnd.

Søgan sigur, at tað var ein maður, NN, sum ætlaði at byggja sær hús í Haraldssundi. Men haraldssundsmenn vildu ikki hava hann til bygdina og noktaðu honum tí grundstykki. NN var sera misnøgdur við hesa avgerð og skuldi tí í hevnisøku siga: „*Tit skulu fáa verri gest enn meg.*" Tað var rottuna, sum hann sipaði til. Stutt eftir hetta var rottan at síggja í Kunoynni, tí at NN skuldi hava slept einum pari út í oynna.

Tó at eingin av teimum fimm fólkunum, sum eg havi tosað við, vilja vera navngivin sum kelda til hesa søguna, so er søgan tó umtalað í bókini „*The Atlantic Islands – A Study of the Faroe Life and Scene*", sum bretski hermaðurin Kenneth Williamson skrivaði um Føroyar eftir kríggið. Kenneth Williamson var giftur føroyskari kvinnu, Esther Louise Rein úr Havn, sum hann átti dóttrina Hervør og sonin Robin saman við. Bókin kom út í 1948.






**Mynd 1.** Spjaðingarmynstrið hjá rottuni í Føroyum. Fyrstu rotturnar komu til Hvalbiar. Hetta var í 1768. Haðani spjaddu tær seg: fyrst til Havnar og hiðani norður eftir Streymoynni. Síðani til Eiðis og restina av Eysturoynni. Seinni komu tær til Vágarnar. Um aldaskiftið, ár 1900, komu tær eisini til tríggjar av Norðoyggjunum.




**Mynd 2.** Fyrstu rotturnar komu til Føroya í 1768. Tað var í Hvalba. Haðani spjaddu tær seg til hinar stóru oyggjarnar. Um hetta mundið gjørdi Jens Christian Svabo sína kendu Føroyaferð, sum hann seinni skrivar um í bókini *„Indberetninger fra en Reise i Færø 1781 og 1782"*. Í hesum stórverki greiðir hann frá ymiskum, sum hann hevur savnað saman um Føroyar og føroysk viðurskifti. Á blaðsíðu 54 til 59 er ein partur um „Om firefødde dyr". Her greiðir Svabo millum annað frá, nær brúna rottan er komin til tær ymisku bygdirnar í Føroyum. Takkað verið Svabo vita vit tí neyvt, hvussu rottan hevur spjatt seg kring landið, og nær rottan kom til tær ymisku føroysku bygdirnar. Hesar upplýsingar eru millum annað grundarlagið undir spjaðingarmynstrinum av rottu í Føroyum, sum er víst á kortinum *(Mynd 1)*.



**Mynd 3.** Hvalastøðin við Kópagarðar norðan fyri bygdina Norðdepil, har norðmenn høvdu hvalastøð um aldarskiftið. Frá hesi hvalastøðini spjaddu rotturnar seg runt á Borðoynni og Viðoynni. Seinni kom hon eisini til Kunoynna.
*Mynd: Føroya Fornminnissavn*

## Týningartiltak móti rottuni í Kunoy í 1952

Eins og aðrastaðni í Føroyum, har rottan kom, gjørdi hon eisini stóran skaða í Kunoy, og tí vildu kunoyingar sleppa av aftur við rottuna.



Í november mánaði í 1952 varð skipað fyri einum stórum týningartiltaki í Kunoy fyri at sleppa av aftur við rottuna. Tað var apotekarin, Dávur Magnussen í Havn, sum skipaði fyri tiltakinum. Tað var hann, sum fekk eitrið til vega, og Landsstýrið stuðlaði tiltakinum fíggjarliga. At hjálpa sær hevði Dávur Sjúrð Patursson úr Kirkjubø.

Við stuttum millumbilum varð eitur lagt um alla oynna; í bø og haga og í lundaurðum, bæði í Haraldssundi og Kunoyarbygd. Bygdafólkini tók væl undir við hesum tiltakinum og løgdu giftina út.

Ein kunoyingur, føddur í 1940-árunum, greiðir soleiðis frá: „Í 1952 var skipað fyri einum tiltaki at týna rottuna í Kunoynni. Tveir menn, Mús (Jóannes Rasmussen) og ein maður úr Kirkjubø, skipaðu fyri. Menn samlaðust í einum neysti í bygdini at baka breyð, har rottugift varð koyrd í breyðið. Næsta dag fóru menn um alla oydna at leggja hesi breyðini út,“ greiðir hesin maðurin frá.

Hesin sami maðurin segði mær, at ein táttur varð yrktur um hetta tiltakið. Tað er tíanverri ikki eydnast mær at at fáa fatur í hesum tátti, men maðurin, sum fortaldi mær søguna, mintist eitt av ørindunum, sum er soljóðandi:

*„Her komi eg við langari nøs,*
*hvat skal eg hava í mínari pøs*“

Hesin „eg-persónurin“, sum sipað verður til í tættinum, er ein langur klænur kunoyingur.

Í samrøðu við Norðlýsið 8. november 1952 greiðir kunoyingurin Steffan Kunoy soleiðis frá hesum tiltakinum: *„Bæði vit og haraldssundsmenn fóru til hetta arbeiði við tí vón at sleppa av við rotturnar, og eg skal siga, at vónin er ikki svikin, tí síðan rottueitrið varð lagt út fyrstu ferð fyri jól, hava rotturnar ongan skaða gjørt, og nú innheystað er í ár, hevur ikki rotta sæst í nakrari veltu, men sjálvandi kann eg ikki taka fyri, at púra eingin rotta er eftir, men tað er í hvussu so er eingin skaði av teimum. Nú vit hava gingið á fjalli, funnu vit ein deyðseyð, men eingin rotta hevði sett á hann. Vit løgdu eisini eitur har, sum lundi eigur, og vóna, at har er eisini gott úrslit*“, endar Steffan Kunoy frásøgnina við blaðið.

## Týningin miseydnaðist

Rotta nørist sera skjótt. Hon gerst longu kynsbúgvin eftir trimum mánaðum. Hon gongur kviðin í 22 dagar og leggur so 6-12 ungar, sum hvør vigar eini 5 g. Rottan leggur 3- 5 ferðir um árið. Soleiðis kann ein einstøk rotta eftir einum ári gerast til einar 860 rottur, og tí er tað ikki løgið, at hon spjaddi seg sera skjótt, tá hon kom til Føroya. At týna rottuna í einari heilari oyggj er tí ikki bara sum at siga tað. Fyri at tiltakið skal eydnast til fulnar, skal tann seinasta rottan eisini avlívast. Er bara eitt par ella bara ein einstøk kviðin rotta eftir, kann hendan nørast víðari, og stutt eftir kann aftur vera nógv til av rottu í oynni.

Oyðingartiltakið av rottuni í Kunoynni í 1952 eydnaðist tíanverri heldur ikki til fulnar. Ein kunoyingur, sum eg havi tosað við, sigur, at eini 4-6 ár eftir skipaðu útleggingina av rottugift var aftur smekkfult av rottu í Kunoyar bygd. *„Ein dagin fangaðu vit sjey livandi rottur, sum børnini í bygdini stuttleikaðu sær við. Ein í senn vórðu rotturnar sleptar leysar á einum bøstykki, tætt við skúlan í bygdini. Síðani royndu tey at fanga rottuna. Onkrar rottur sluppu tó undan og runnu í Myllánna,*“ greiðir kunoyingurin við spenningi frá.

Rotturnar munnu hava fylgt nógv í bygdarlívinum í Kunoy í fimmtiárunum, tí ein eldri kona í bygdini, sum eg havi tosað við, minnist týðuliga rotturnar í bygdini. Við eldhuga greiðir hon frá: *„Tá eg var smágenta og gekk í skúla í Kunoy, plagdu dreingirnir ofta at fanga rottur, sum teir so sleptu leysum uttan fyri skúlan*“.

Síðani miseydnaðu royndina hjá kunoyingum at sleppa av við rottuna í 1952 er einki gjørt fyri at týna rottuna í oynni. Rottan er tí enn í Kunoynni, har hon, eins og aðrastaðni í landinum, framvegis ger stóran skaða.

Heldur ikki aðrastaðni í Føroyum er tað eydnast at sleppa av aftur við rottuna. Tí finst rottan framvegis á sjey av teimum 18 oyggjunum í Føroyum: Viðoy, Borðoy, Kunoy, Eysturoy, Streymoy, Vágum og Suðuroy. Ongar rottur eru enn komnar til Sandoynna, Nólsoyar ella Kalsoynna, men tað er helst bara ein spurningur um tíð, til hon eisini er komin hagar, tí í dag er ferðasambandið so gott til hesar oyggjarnar, og bilfergur sigla fleiri ferðir um dagin hagar, bæði við fólki og farmi.



Nr. 45 — 8. november 1952.

**Væleydnað gagnverk.**

Millum tær oyggjarnar í landi okkara, sum eru fongdar við rottur, hevur Kunoy verið ein.

So miklan ampa sum fólk hevur av hesum djórum, so nógvur trupulleiki sum stendst av teimum, so nógvan skaða tey gera, og tey virðir tey oyða — — — so fóru menn at hugsa um tað kundi verða gjørligt her at ráða bót við fyrst at royna í eini av teim minnu oyggjunum. Eydnaðist hetta, so kundi kannska seinni verða farið víðari. Royndin varð so gjørd við Kunoynni.

Dávur, apotekarin, sum hin kóni og vælhugaði maðurin hann er, tá tað krevst at fara til verka, fekk eitrið til vega, meðan Landsstýrið skoytti upp í kostnaðin av keypinum.

Hann fór so norð at skipa fyri, og við honum fór Sjúrður Patursson.

So varð farið at leggja út um alla oynna, við hús bæði í Haraldssundi og Konoyarbygd um bøin, um hagan og ikki at tala um lundaurðarnar, har hesu djórini ikki høvdu minst veldi.

Og alt fólkið í oynni tók undir við hvørjari hond. Og tá gekk tað, sum tað altíð gongur, tá gott samanhald er.

Úrslitið varð sum Steffan Kunoy her greiður mær frá:

»Bæði vit og Haraldssundsmenn fóru til hetta arbeiði við tí vón at sleppa av við rotturnar, og eg skal siga, at vónin er ikki svikin, tí síðan rottueitrið varð lagt út fyrstu ferð fyri jól hava rotturnar ongan skaða gjørt, og nú innheystað er í ár, hevur ikki rotta sæst í nakrari veltu, men sjálvandi kann eg ikki taka fyri at púra eingin rotta er eftir, men tað er í hvussu er eingin skaði av teimum. Nú vit hava gingið á fjalli, funnu vit ein deyðseyð, men eingin rotta hevði sett á hann Vit løgdu eisini eitur har sum lundin eigur og vóna at har er eisini gott úrslit.«

Soleiðis endar Steffan Kunoy frágreiðing sína.

S. P.

**Mynd 4.** 8. november 1952 hevur Norðlýsið forvitnisliga grein, har greitt verður frá átakinum at týna rottuna í Kunoynni.


**Heimildir:**

Kyrjarheyg, M. (2014). Stóri týnarin: Rottan. Síða 210-212 í bókini "Jústa-ættin - og aðrar Viðareiðissøgur". Ritstjórnað: Líggjas í Bø.

Magnussen, E., Jensen, J. K. (2016). Nýggja rottukanningin - Sjáldsamar loppur á føroyskum rottum. Fróði nr. 1, p. 30-33.

Skarði, S. (1956) Føroyski leypurin. Fróðskaparrit 5:108-152.

Svabo, J.C. (1959). Om firfodde dyr. Indberetninger fra en Reise i Færøe 1781 og 1782. København. Selskabet til Udgivelse af Færøske Kildeskrifter og Studier, 1959, p. 54-59.

Williamson. K. (1948) The Atlantic Islands - A Study of the Faroe Life and Scene. Routledge & K. Paul, 385 síður.







# HISTORY.FO HENT LEITI-AMBOÐ




*History.fo* hevur nú átta ár á baki og hevur verið eitt hent amboð bæði hjá granskarum og leikfólkum

**History.fo** er ein heimasíða við keldum og hagtølum um søgulig, føroysk viðurskifti. Tjóðskjalasavnið, fyrr Føroya Landsskjalasavn, umsitur heimasíðuna. Á History.fo ber til at leita fram ymiskt tilfar og taka tað av heimasíðuni. Tænastan er ókeypis. Einasta krav til brúkarar er, at tey vísa til kelduna.

## Lættari atgongd fyri øll

Endamálið við history.fo er at gera søguligar keldur, søgulig hagtøl og annað søguligt tilfar lættari atkomuligt fyri almenningi og fyri fakfólki, bæði í Føroyum og aðrastaðni. Ætlanin er, at so nógv tilfar sum gjørligt verður savnað á einum stað, so at øll sleppa fram at hesum tilfari. Á henda hátt skal bera til hjá øllum, sum hava brúk fyri at granska í ymiskum søguligum viðurskiftum í Føroyum, at fara inn á **history.fo** at finna fram upprunatilfar.

## Skipan og keldubólkar

Skjølini á heimasíðuni eru býtt upp í bólkar eftir evni ella eftir, hvør myndugleiki hevur framleitt tey. Hetta ger tað lættari hjá brúkaranum at finna skjølini. Størsti keldubólkurin higartil eru kirkjubøkur, sum innihalda upplýsingar um føðing/dóp, ferming, vígslu og deyð hjá øllum føroyingum.

Aðrir keldubólkar eru sokallaðar 'frágreiðingar' (Indberetninger), sum embætisfólk hava sent miðfyrisitingini. Ein teirra eru fólkateljingarnar, tann elsta frá 1801 og tann nýggjasta frá 1925.



Í hesum bólkinum eru eisini sýslumansfrágreiðingarnar frá 1930 til 1900, sum eru avskrivaðar og lættar at lesa og leita í.

Flestu keldurnar eru lagdar út í upprunaformi sum skanningar, meðan aðrar eru avskrivaðar. Løbner'sa Tabellir eru t.d. lagdar út í excel-formati, so øll kunna kopiera og beinleiðis rokna uppá tey mongu tølini, sum henda keldan hevur. Ymisk fólk hava arbeitt við keldunum ella avskrivað tær.

*Fróði*



# Søgur um orð

# Fæ og felag

Orðið *felag* er nógv at hoyra og síggja, og vit hava í føroyskum haraftrat ein hóp av alskyns samansetingum við hesum orði.



Zakaris Svabo Hansen

Men hvussu er í veruleikanum við orðinum **felag**, sum elur so nógvar samansetingar av sær? Orðið er samansett av orðunum „fe" og „lag". „Fe" er eldri snið av orðinum „fæ", sum í føroyskum annaðhvørt kann merkja 'neyt, fenaður', t.d. tá ið vit tosa um „fólk og fæ", ella kann hava týdningin 'ríkidømi, ognir', t.d. tá ið vit tosa um „gull og fæ". Í samansetingum sæst henda merking eisini aftur í orðum sum eitt nú *fæloysingur*, *stovnsfæ* og *leysafæ*.

Men umframt orð av hesum slag hava nógv onnur orð, sum javnan verða havd á lofti, eisini tilknýti til „fæ" í merkingini 'ríkidømi, ognir, peningur', tó at sambandið ikki er so eyðsæð við fyrsta eygnakast. Her snýr tað seg serliga um orð, sum byrja við „fíggjar-". Av handahógvi kunnu nevnast *fíggjarár*, *fíggjarlóg*, *fíggjarmál*, *fíggjarstøða*, *fíggjarvánir* o.s.fr. Hesi orð hava øll tað í felag, at tey hava við pening og ognir at gera, og fyrri liður „fíggjar" er hvørsfall í eintali av fæ. Sagnorðið at *fíggja*, lýsingarorðið *fíggjaður* og navnorðið *fígging* eru tískil øll runnin úr navnorðinum fæ. Nýggjar samansetingar sum t.d. *fíggingarmøguleiki* og *fíggingargrunnur* eru sostatt grundaðar á at fíggja og fígging og byggja tí bara óbeinleiðis á orðið fæ.

Seinni partur í felag er „lag", og tað orðið er sum kunnigt sera fjølmerkt í føroyskum. Í orðinum felag ber „lag" merkingina 'tað at vera saman' ella 'okkurt ið hoyrir saman'. Tann upphavliga merkingin av felag er sostatt 'fæ ella góðs, ið er lagt saman'. Tað er tískil okkurt, ið hoyrir saman og myndar eina eind. Siga vit t.d., at „teir eiga bátin í felag", ja so rímar tað væl við hesa upprunamerking. Grundmerkingin í orðinum felag er eisini varðveitt í samansetingum, hóast hon ikki endiliga snýr seg um ognir, men kann vera alt møguligt annað, ið onkursvegna hoyrir saman, eitt nú áhugamál, ítriv o.tíl.

Avleitt av orðinum felag er ein *felagi* í merkingini 'lagsbróðir' ella 'vinur'. Felagi merkti upprunaliga 'ein ið leggur góðs ella fæ saman við øðrum'. Seinni er tað so farið at vera orð um fólk, ið eru saman um okkurt, t.d. eru í somu støðu ella umboða okkurt saman. Tað kann vera eyðsæð, hvat ið fólk eru saman um. Skúlafelagar eru saman um tað at ganga í sama skúla og starvsfelagar starvast í sama arbeiði ella í somu vinnugrein. Í øðrum førum kann tað, sum fólk hava í felag, vera av minni ítøkiligum og eyðkenniligum slag. Vit tala eitt nú um telefonfelagar, sum ikki hava annað í felag, enn at teir hava telefon.

Orðið „felagi" er annars úr norðurlandamálum lænt inn í enskt mál og hevur fingið sniðið „fellow" og merkir har m.a. eisini 'vinmaður' og 'lagsbróðir'.



# LANDSBÓKASAVNIÐ 190 ÁR

5. november 1828 staðfesti Fríðrikur VI. kongur reglugerðina fyri Færø Amts Bibliotek. Hesin dagurin – fyri 190 árum síðani – hevur síðani verið mettur sum stovningardagur hjá føroyska tjóðbókasavninum, sum í dag eitur Landsbókasavnið.




**Vígdis Bjarnadóttir**
vigdisb@landsbokasavnid.fo
Bókavørður DB / Cand. mag. í mentan og miðling


Fyrstu ferð, tað var upp á tal at stovna bókasavn í Føroyum, var í 1826, tá eitt lestrarfelag var sett á stovn í Havn. Tá búðu bara uml. 6000 fólk í Føroyum, tað vóru bara tvær bøkur komnar út á føroyskum, og sambandið við umheimin var avmarkað, so tað var trupult at fáa til vega bókligt tilfar.

Hóast hesar umstøður høvdu eldhugað fólk, bara trý ár seinni, megnað at fingið til vega nokk av bókum til eitt bókasavn, eini bókasavnshús stóðu liðug bygd til endamálið, og karmar vóru skipaðir fyri framhaldandi bókasavnsvirksemi.

Søgan um, hvussu hetta var møguligt upp á so stutta tíð, er ein søga um eldsálir, netverkan og um tíðarrák.

## Upplýsingartíðin

18. øld í Evropa verður nevnd upplýsingartíðin og var eyðkend av, at vitan og skynsemi vóru sett í hásæti, og spurningar vórðu settir við gamlar fatanir. Ein teirra, ið umboðaði hetta tíðarrákið í Føroyum, var Jens Christian Svabo (1746-1824). Hann var tann fyrsti, ið arbeiddi fyri at varðveita føroyskt mál og fornminni, og tað var m.a. ávirkan frá honum, ið gjørdi, at farið varð undir at savna inn gomlu føroysku kvæðini.

Tá kendi danski plantufrøðingurin Hans Christian Lyngbye (1782-1837) kom til Føroya summarið 1817, hitti hann Svabo, sum tá var ein gamal maður, og við vegleiðing frá Svabo fór Lyngbye at skriva niður føroysk kvæði.

Í 1822 gav Lyngbye út bókina um Sjúrðarkvæðini, ið var fyrsta prentaða bók, ið kom út á føroyskum, og tað var Johan Hendrik Schrøter, prestur, (1771-1851) – ið var giftur við systurdóttur Svabos – ið hjálpti honum at skriva upp kvæðini.

Hendan fyrsta bókin á føroyskum máli vakti ans uttanlands og vakti áhugan fyri Føroyum, kvæðunum og fornminnum her. Uttan hendan áhuga hevði neyvan borið til at fingið neyðugu hjálpina og stuðulin uttanífrá, tá bókasavn skuldi stovnast her á landi.

## Í kjalarvørrinum av upplýsingartíðini

Í kjalarvørrinum av upplýsingartíðini lótu fleiri og fleiri almenn bókasøvn upp í londunum uttan um okkum, og bókasøvn, sum higartil høvdu verið privat ogn hjá fúrstum og ríkmonnum, blivu nú latin upp fyri almenninginum.

Hóast prestar og embætismenn í Føroyum áttu bøkur, ið teir høvdu brúk fyri í sínum embæti, so var tó einki nóg stórt og fjøltáttað savn í landinum til at vera grundarlag undir einum almennum bókasavni.

Ein av føroyingunum, ið fingu í lag at savna saman bøkur og handrit til eitt alment bókasavn, var Jens Davidsen (1803-1878).

> ***Det Kongelige Nordiske Oldskriftselskab***
> *Det Kongelige Nordiske Oldskriftselskab var stovnað í 1825 og var sera virkið í Norðurlondum og aðrastaðni í heiminum í fyrru helvt av 1800-talinum. Endamálið hjá felagnum var tá sum nú at fremja útbreiðslu av vitan og kunnleika um norðurlendska mentantarsøgu í fornøld og miðøld m.a. við útgávu av bókum og tíðarritum.*
> *Ein av stovnarunum var málgranskarin og fornfrøðingurin Carl Christian Rafn (1795-1864), sum var fyrsti skrivarin í felagnum. Við C. C. Rafn á odda fekk felagið limir víða hvar úr heiminum og bleiv eitt av størstu og førandi lærdu feløgunum tá í tíðini.*

Virksemið í Oldskrift-felagnum var í samsvar við romantiska tíðarrákið í 19. øld, ið hámetti kærleikan til tjóð, mál, søgu og mentan. Eisini í Føroyum hevði felagið sínar limir, sum fylgdu væl við í arbeiðinum hjá Oldskrift-felagnum, og sum íðin breiddu út bókmentirnar her í oyggjunum. Jens Davidsen var umboðsmaður hjá Oldskrift-felagnum í Føroyum.

Tíðarrákið í romantikkini gjørdi, at kvæði, sagnir og annar skaldskapur av mannamunni, sum hevði verið inngrógvin partur av føroyska gerandisdegnum, nú bleiv mettur sum dýrgripur, ið skuldi skjalfestast og varðveitast. Fleiri føroyingar fóru t.d. at skriva niður kvæði um hetta mundið. Og C. C. Rafn, sum hevði serligan áhuga fyri føroyskum fólkaminnum og føroyskum máli, eggjaði til og samstarvaði við føroyingar um hetta arbeiði.

Eitt úrslit av hesum samstarvinum bleiv Færø Amts Bibliotek.

## Byrjanin

Í 1826 fekk J. Davidsen bræv frá C. C. Rafn (dagfest 12. sept. 1826), har hesin gjørdi vart við íslendska bókasavnið, sum hann sjálvur hevði verið við til at seta á stovn í 1818, og ein frágreiðing um hetta lá saman við brævinum. Hetta birti nokk upp undir áheitanina, sum J. Davidsen sendi til Rafn ein góðan mánað seinni (dagfest 18. okt. 1826), har hann harmaðist um, at tað var vorðið torførari hjá "dannede Færinger, som elske videnskabelig Læsning" at fáa fatur á bókmentum.

Í brævinum greiðir J. Davidsen frá, at hann saman við Mikkjali Müller, skipara, (1765-1849) hevði stovnað eitt lestrarfelag, sum umfataði Havnina og bygdirnar har um vegir, við tí endamáli at byggja upp eitt bókasavn. Embætisfólk og onnur áhugað vóru fús at lata lestrarfelagnum bøkur, sum síðani kundu lánast út fyri eitt lagaligt gjald, men hóast felagið fekk góða móttøku, so sóu stovnararnir báðir, at teir fóru ikki at røkka á mál við tí avmarkaðu inntøku, útlánið gav. Tí heittu teir í brævinum á C. C. Rafn um hjálp og stuðul at fáa til vega bøkur til "det nu organiserede Læsebibliothek".

Áheitanin var ikki til fánýtis, og C .C. Rafn arbeiddi skjótt og effektivt. Longu við fyrsta skipinum um várið 1827 kom fyrsta bókasendingin - 62 bøkur – sum hann og aðrir góvu føroyska bókasavninum.

## Leiðbeiningar frá C. C. Rafn

Við fyrstu bókasendingini frá C. C. Rafn kom bræv (dagf. 1. apríl 1827) til "de Herrer Bestyrere af Færøernes Amts Bibliothek" J. Davidsen og M. Müller, og í brævinum stóð m.a.:

*"Jeg beder dette modtaget som Bidrag til det, som jeg haaber, vordende Amtsbibliotheks Grundlæg.*

*Overbevidst om en saadan Stiftelses Vigtighed, skal jeg efter Evne bidrage til at den kan komme i Stand. For at den kan have den behørige Fasthed og Varighed bør den staae under Amtsøvrighedens Overbestyrelse.*



**Mynd 1.** Færøiske Qvæder om Sigurd Fofnersbane og hans Æt



**Mynd 2.** Carl Christian Rafn, professari (1795-1864)

*Rafn grundlegði fyrstu bókasøvnini í Íslandi, Føroyum og Grønlandi:*

- *Stiftsbókasafn Íslands í Reykjavík, 1818 – seinni Landsbókasafn Íslands.*
- *Færø Amts Bibliotek í Havn, 1828 – seinni Føroya Landsbókasavn.*
- *Landsbókasavnið í Nuuk, 1829 – Nunatta Atuagaateqarfia.*

*Med megen Agtelse og Lykønskning til Held i deres Bestræbelser i dette fædrelandske Anliggende tegner jeg mig Deres frb. Rafn"*


Regler for Udlaanet af Færøe Amts Bibliothek
§ 1 Afbenyttelsen af Bibliotheket staaer aaben for enhver Beboer paa Færöe.
§ 3. Udlaanet skeer i Almindelighed uden Caution, med mindre Bibliothekaren skulde ansee en saadan fornøden

**Mynd 3.** Útlánsreglur §1 og 3 úr Forhandlings Protocol for Færöe Amtsbibliothek, 1831

Longu sama mánað sendu J. Davidsen og M. Müller takkarskriv (dagfest 30. apríl 1827) til C. C. Rafn, har teir spurdu, hvussu íslendska bókasavnið var skipað – m.a. um útlánið har er ókeypis ella ikki.

Rafn mælti teimum til í brævi (dagfest 3. juni 1827) at:

*»Biblioteket maa være offentligt og Bøgerne udlaanes gratis, naar det tilsigtede Formaal, Oplysnings og Kundskabers Udbredelse, skal lettest opnåes.«*

## Eitt av fyrstu almennu og ókeypis bókasøvnunum

At C. C. Rafn, professari, skeyt upp, at Færø Amts Bibliotek skuldi vera alment, og útlánið skuldi vera ókeypis fyri øll vísir júst, hvussu framskygdur hesin maðurin var.




Ole Harbo, rektari á Danmarks Biblioteksskole 1983-1998, skrivar soleiðis í eini grein um Færø Amts Bibliotek:

*"Det er bemærkelsesværdigt, at gratisprincippet indføres på Færøerne længe inden det bliver lovfæstet i hele riget, men der er jo også andre pionértræk: Forslaget om skattefinansiering adskillige år inden den første lov herom – i England 1850 – og opførelsen af et hus til et offentligt bibliotek længe inden det skete andre steder i kongeriget."*

Hóast fleiri bókasøvn høvdu latið upp fyri almenninginum, so vóru tey als ikki ókeypis at brúka. Tey fyrstu almennu bókasøvnini við ókeypis útláni tóku seg upp í Onglandi – og USA við Free Public Libraries – í 1850, og hesi londini gjørdust fyrimyndir fyri norðurlendsku bókasavnsverkini. Í Danmark var loyvt at taka gjald fyri útlán til 1950.

Í dag eru almenn bókasøvn, við ókeypis útláni fyri øll, ein sjálvsagdur partur av øllum nútíðar samfeløgum.

## Bøkur koma streymandi

Rafn hevði samband við fólk víða um heim, og hann eggjaði einum breiðum skara av fólki at geva bøkur til hetta komandi bókasavnið. Og eisini embætismenninir í Føroyum stuðlaðu við at heita á kenningar, bókahandlar og forløg í útlondum um at veita stuðul til føroysku bókasavnssakina. Amtmaðurin Christian Ludvig Tillisch (1797-1844), ið fegin vildi fremja upplýsing manna millum í Føroyum, gjørdi tað sama. Tilsamans var alt hetta eitt stórt netverk av fólki bæði innan- og uttanlands.

Úrslitið var, at komandi árini streymaðu bøkur frá útheiminum til bókasavnið í lítla høvuðsstaðnum í Norðuratlantshavi. Úr Danmark komu bøkur frá so mætum monnum sum N.F.S. Grundtvig, Rasmus Rask, Adam Oehlenschläger. Men bøkur koma eisini úr fleiri øðrum londum.

## Bókasavnið verður skipað

Á ólavsøku í 1828, tá ið embætismenninir sum vanligt møttust í Havn, varð viðtikið eftir áheitan frá Tillisch, amtmanni, at stovna Færø Amts Bibliothek sum eitt alment bókasavn, at royna at skapa fíggjarligt grundarlag fyri rakstrinum og at fáa bygt eini bókasavnshús.

Allir embætismenninir skuldu lata bókasavninum 5 ríkisdálar árliga hvør til raksturin. Men eini bókasavnshús máttu fáast til vega. Fyri at fáa ráð til tað varð bønarskriv sent til kongs um at lata 500 ríkisdálar í silvurvirði til húsabygging.



Í september varð ein skipan gjørd fyri bókasavnið, og tað bleiv, sum C. C. Rafn mælti til, amtsyvirvaldið – amtmaðurin og fútin – ið kom at vera yvirstjórn bókasavnsins. Skipanin bleiv tann, at amtsyvirvaldið skuldi velja stjórnina, ið skuldi vera ein trímannanevnd, sum skuldi áseta útlánsreglur, hava umsjón við bókasavninum og velja bókavørð.

Hendan skipanin varð so staðfest av kongi 5. nov. 1828, sum merkti, at Færø Amts Bibliotek nú formliga varð sett á stovn.

## Bókasavnshús

J. Davidsen virkaði sum bókavørður frá byrjan og tók sær av bókunum, sum komu sendandi. Christian Ludvig Tillisch, amtmaður, hevði veitt bókasavninum høli í amtsskrivstovuni í fyrstu syftu, men á amtsskrivstovuni var alt ov trongt til bókasavnsvirksemið.

Frú Løbner, kona fyrra amtmann Løbner, gav eitt hóskandi grundstykki til eini bókasavnshús í vestara enda av Quillingsgarði. Kongur hevði játtað umbønini og givið peningaligan stuðul til húsabyggingina.

## Rak ár og feit ár

Hóast bókasavnssøgan í Føroyum byrjaði sum ein sólskinssøga, so kom Færø Amts Bibliotek í tungan róður, tá nøkur ár vóru fráliðin. Fíggjarligu karmarnir gjørdust vánaligari og vánaligari.

C. C. Rafn fylgdi trúgvur við, hvussu gekk við savninum, sum hann hevði verið við til at stovna. Og av og á eydnaðist honum at útvega bókasavninum peningagávur frá vinum og vísindamonnum, men lítið batti.

Jens Davidsen starvaðist á bókasavninum alt sítt lív, hóast korini ikki vóru tey, sum hann og M. Müller høvdu ætlað av fyrstan tíð. Tað var honum fyri at takka, at bókasavnið ikki fór í órøkt og forfórst. Men tá Davidsen doyði í 1878, hevði eingin umsorgan fyri bókasavninum, og bøkur, ið vóru givnar savninum, vórðu pakkaðar niður óinnbundnar. Fíggjarliga gjørdist støðan so ring, at avgjørt var at leiga part av húsinum út til Sparikassan, sum helt til har líka til 1905. At enda var so trongligt inni í húsinum, at ymisk skjøl, ið Davidsen hevði varðveitt, vórðu burturbeind og brend.

## Bókasavnið hóraði undan

Tíbetur vaknaði hugurin til bókasavnið aftur um 1900. Bókasavnið fekk fasta játtan frá Løgtinginum, og E. A. Traber varð settur í fast starv. Hann skrásetti allan bókastovnin og syrgdi fyri, at bókasavnið hevði regluligar upplatingartíðir.

Fyrsta bókasavnið í landinum, Færø Amts Bibliotek, hóraði undan.

Landsbókasavnið er í dag elsti almenni stovnur í Føroyum.



**KELDUR:**

**Sverri Fon (1985)**. Mentunarstovnar. – Í: Føroyar II. – Keypmannahavn: Det Danske Forlag

**Ole Harbo (2004)**. Færø Amts Bibliotek. – Í: Bibliotekspressen, nr. 15, s. 434-435

**Ole Harbo (1987)**. Gratis ydelser og betalinger ved danske biblioteker i fortid og nutid. Í: Betaling og bibliotek. Kbh.: Danmarks Biblioteksforenings Forlag, s. 9-25

**M.A. Jacobsen (1929)**. Færø Amts Bibliotek 1828-1928. – Í: Bogens verden, nr. 6, s. 73-81

**M.A. Jacobsen (1929)**. Føroya amts bókasavn 1828-1928. - Tórshavn

(Øll brøvini, ið eru endurgivin í greinini, eru í hesi bók)

Det Kongelige Nordiske Oldskriftselskab: Selskabets historie

Heintað 16. okt. 2018 frá: https://www.oldskriftselskabet.dk

Kim Simonsen (2015). Before the Library. – Syðrugøta: Network for European Travel Writing to the Romantic Far North 1800-1900



Brot úr gerðabók Færøe Amts Bibliothek

# UPPLÝSING OG ØKISMENNING

Í goymslum sínum hevur Landsbókasavnið í varðveitslu elstu gerðabók stovnsins. Bókin er ein sokallað *Forhandlings Protokol for Færöe Amts Bibliothek*, og er fyrsta gerðabókin, sum stjórnin hjá bókasavninum førdi. Sjálv bókin er heilar 94 síður, men bert 23 av síðunum eru skrivaðar. Hóast bókasavnið byrjaði sítt virksemi longu í 1828, m.a. við at savna inn bøkur, og húsini stóðu liðug í 1829, so fór stjórnin ikki undir at skriva gerðabók fyrr enn í mai 1831. Seinasti fundur, sum er skrásettur í gerðabókini, var hildin hin 12. december 1844.



**Sámal Tróndur F. Johansen**
SamalTrondurJ@skjalasavn.fo
Søgufrøðingur og geografur
Stjóri á Tjóðskjalasavninum

**Nógv av tí, sum stendur í gerðabókini**, verður umrøtt í 100 ára minningarritinum *Føroya Amts Bókasavn 1828-1928*. Her skulu vit kortini umrøða okkurt av tí, sum stendur í gerðabókini viðvíkjandi tí fyrstu reglugerðini, sum stjórnin setti í gildi. Serliga verður nomið við ætlanirnar fyri, hvussu gerandisvirksemið skuldi skipast á bókasavninum, og hvussu bókasavnið, uttan nakra fasta játtan, royndi at bjóða øllum fólki í Føroyum ókeypis og javnbjóðis atgongd.

Áðrenn farið verður víðari, skal gerast greitt, at umrøðan her av virkseminum hjá bókasavninum fyrst og fremst er grundað á, hvussu stjórn og leiðsla á bókasavninum hugsaðu at skipa arbeiðið, serliga útlánið. Hvussu væl tað eydnaðist teimum at fremja ætlanirnar, verður ikki tikin støða til, m.a. tí hetta ikki er kannað í hesum umfari.

## Arbeiðið verður skipað

Bókasavnið hevði virkað í gott tvey ár, tá fyrsti stjórnarfundur verður umrøddur í gerðabókini. Eisini var Jens Davidsen, skrivari á Amtsskrivstovuni, longu útnevndur bókavørður og kassameistari. Hóast hetta vóru enn ongar reglur um gerandisvirksemið niðurskrivaðar. Heldur eingin løn var ásett, hvørki til bókavørðin ella kassameistaran. Á fyrsta fundinum, sum var hin 9. mai 1831, ásetti stjórnin eina fyribils løn til Jens Davidsen á 10 ríkisbankdálar árliga, hetta til fíggjarstøðan hjá bókasavninum gjørdist betri. Á sama fundi átók nývaldi stjórnarlimurin, fútin Christian Plöyen, sær at gera uppkast til reglugerð fyri bókasavnið. Á triðja stjórnarfundinum, sum var hin 21. desember sama ár, samtykti stjórnin endaligar reglur fyri virksemi bókasavnsins.

Reglurnar fyri virksemi bókasavnsins vórðu býttar upp í tvey:

A. *Instrux for Bibliothekaren og Casseren* og

B. *Regler for Udlaanet af Færöe Amts Bibliothek.*

Hóast bókavørðurin/kassameistarin vóru ein og sami persónur, so vóru uppgávurnar hjá hesum báðum embætum greitt atskildar í reglugerðini. Bókavørðurin fekk ábyrgd fyri at skipa fakliga virksemið, meðan kassameistarin fekk ábyrgd fyri tí fíggjarliga. Bókavørðurin hevði ábyrgdina av øllum ognum bókasavnsins og skuldi m.a. umsita útlán og skráseting av bókum. Eisini skuldi bókavørðurin leggja fyri stjórnina uppskot um ábøtur av ymiskum slagi, serliga um hvørjar bøkur bókasavnið átti at útvega sær. Kassameistarin skuldi m.a. krevja inn møguligar inntøkur og gjalda útreiðslur og eina ferð um árið leggja roknskap fyri stjórnina til góðkenningar. Eisini var kassameistarin skrivari hjá bókasavninum, samstundis sum hann skuldi føra gerðabókina og skipa skjalasavnið.

## Ókeypis brúk fyri (nærum) øll

Færøe Amts Bibliothek varð stovnað um sama mundið, sum hugsjónin um fólkabókasøvn breiddi seg í vesturheiminum - eisini Norðurlondum. Kjarnin í hugsanini um fólkabókasøvn var, at tað skuldi vera ókeypis hjá øllum, høgum og lágum, at fáa atgongd til hesi bókasøvn. Sjálvt um bókasavnið í Havn ikki var fíggjað av statinum við skattainntøkum, so var tað sambært §3 í reglugerðini sum útgangsstøði ókeypis at læna bøkur.

*Udlaanet skeer i Almindelighed uden Caution, med mindre Bibliothekaren skulde ansee en saadan fornøden.*

Ein avbjóðing var tó, at Færøe Amts Bibliothek onga fasta játtan hevði, hvørki til rakstur ella íløgur. Tað hevði kostað nógv at byggja húsini, og ókeypis var ikki at reka bókasavnið heldur. Tí vantaði peningur frá byrjan, og ringt var at fáa endarnar at røkka saman tey fyrstu árini. Einasta fasta inntøkan hjá Færøe Amts Bibliothek var eitt gjald, sum embætisfólk á einum fundi á Ólavsøku 1828 høvdu bundið seg til at gjalda - fimm ríkisbankdálar árliga frá hvørjum. Restin vóru gávur, sum Bókasavnið fekk frá fólki, uttanlands og í Føroyum, og frá myndugleikum. Hóast nógv lótu gávur, serliga bøkur, var hetta ikki nóg mikið, og so hvørt sum tíðin leið, vísti tað seg ikki at vera so lætt heldur at fáa árliga gjaldið frá embætisfólkunum. Arbeitt var nógv øll tey fyrstu árini við at fáa fólk og myndugleikar at lata meira gávur, men hetta eydnaðist ikki nóg væl. Tí helt bókasavnið áfram at mangla fígging, bæði til rakstur og íløgur.

**Mynd 1 (vinstrumegin).** Á fremstu síðu í gerðabókini verður bókin løggildað (…) til deri at indföre Færöe Amts-bibliotheks Directions Forsamlinger. Av tí at eingin próstur var um júst hetta mundið, skrivar amtmaður Tillisch undir vegna báðar.



**Mynd 2.** Undirskriftir frá stjórnini, sum samtykti reglugerðirnar hin 12. desember 1831. Frá vinstru stjórnarlimirnir Frederik Ferdinand Tillisch, amtmaður, Christian Pram Gad, sóknarprestur í Suðuroy og Christian Pløyen, landfúti. Uttast til høgru Jens Davidsen, skrivara hjá nevndini. Undirskriftin hjá fjórða stjórnarliminum J.P. Gorm, sorinskrivari, vantar.

**Mynd 3.** Sambært reglum fyri útlán fingu fólk í útjaðaranum, t.d. í Suðuroynni, loyvi til bæði at læna fleiri bøkur hvørja ferð og at hava tær longur enn fólk í miðstaðarøkinum, t.d. í Havn. Á kortinum sæst, hvussu Føroyar vóru býttar upp í trý ymisk 'útlánsøki'. Sostatt kundu fólk í útjaðaranum, t.d. í Suðuroynni, læna bøkurnar í út við hálvt ár.




Sum heild kundu øll, sum búðu í landinum, brúka bókasavnið púra ókeypis. § 10 í reglugerðini fyri útlánið á bókasavninum byrjar eisini soleiðis:

*For Bibliothekets Afbenyttelse og Laan fra samme erlægges i Reglen ingen Betaling (...).*

Vantandi inntøkurnar til at reka bókasavnið máaðu tó undan hugtakinum um, at øll skuldu fáa ókeypis atgongd. Tí legði § 10 eisini upp til, at tað var øllum frítt sjálvboðin at lata bókasavninum gávur:

*(...) derimod staaer beroer det paa Enhver, hvad han frivillig vil bidrage til Bibliothekets Forögelse og Vedligeholdelse.*

Royndirnar vístu tó, at sjálvbodnar gávur ikki vóru nóg mikið, og hetta hevur helst verið orsøkin til, at stjórnin fyri bókasavnið síðst í somu grein gav sær sjálvum myndugleika til í serligum førum at nokta ávísum fólki at brúka bókasavnið ókeypis:

*Dog forbeholder Directionen sig at nægte Adgang til laan og anden Benyttelse af Bibliotheket for saadanne, som kunne, men ikke ville yde det noget Bidrag.*

Grundleggjandi hugsanin var, at øll skuldu hava møguleika at brúka bókasavnið ókeypis. Men av tí at bókasavnið ikki fekk nóg mikið av sjálvbodnum gávum, helt stjórnin tó, at neyðugt var at hava ein møguleika fyri at áleggja múgvandi fólki gjald sum treyt fyri nýtslu. Um hesin myndugleiki – at nokta ávísum fólki at brúka bókasavnið – nakrantíð varð brúktur, framgongur tó ikki av gerðabókini.

## Útlánspolitikkur og 'økismenning'

Bókasavnið skuldi hava opið tveir tímar um vikuna, mikudag og leygardag kl. 12-13. Greitt var, at fólk í Havn høvdu lættast atgongd til bókasavnið. Jú longri burtur fólk búðu, tess verri vóru umstøðurnar at læna bøkur. Fólk ferðaðust antin til gongu ella við báti, og tí var ikki altíð so lætt hjá avbygdarfólki at koma til Havnar at læna bøkur, serliga um veturin. Hetta hevur stjórnin helst hildið verið í stríð við hugsanina um frítt og javnbjóðis útlán til øll. Tí álegði hon eisini bókavørðinum at lata upp fyri avbygdarfólki uttan fyri vanligu upplatingartíðirnar:

*(...) Directionen (forventer), at Adgang til Bögerne ei vil blive nægtet en Reisende ogsaa til usædvanlig Tid.*

Um fólk ikki sjálvi høvdu møguleika at koma til Havnar at heinta bøkurnar, skuldu tey senda eitt umboð (Commissionær) fyri seg at heinta tær.

Serligar upplatingartíðir o.tíl. var tó ikki nóg mikið sambært stjórnini, sum helt, at tað var neyðugt at gera tað enn lættari hjá fólki, sum búði aðrastaðni í landinum, at læna bøkur. Fólk uttan fyri 'miðstaðarøkið' skuldu hava møguleika fyri at læna fleiri bøkur í senn og í longri tíð. Í reglugerðini vórðu Føroyar tí býttar upp í trý øki við hvør sínum treytum fyri at læna bøkur, t.e. hvussu nógvar bøkur tey kundu læna í senn, og hvussu leingi tey kundu læna bøkurnar hvørja ferð. Hugsanin var, at tess truplari umstøðurnar vóru at ferðast til Havnar, tess fleiri bøkur skuldi tað bera til at læna hvørja ferð, og tess longri bar eisini til at læna bøkurnar.

Tað innasta økið, haðani stytst var til Havnar, fevndi um Suðurstreymoy, Kollafjørð, Skálafjørðin og Nólsoy. Fólk hiðani kundu einans læna upp til tvær bøkur hvørja ferð. Fólk úr hesum økinum kundu læna bøkurnar í mesta lagi fýra vikur.

Fólk, sum búðu í næstinnasta økinum, tvs. í Norðurstreymoy, í restini av Eysturoynni, í Vágum, í Sandoynni, í Skúvoynni, í Hesti og Koltri, kundu læna upp til fýra bind og í mesta lagi í átta vikur hvørja ferð. Fjarskotnastu økini vóru Suðuroy, Stóra Dímun, Fugloy og Mykines. Fólk haðani kundu eisini læna fýra bind í senn, men í væl longri tíð; um summarið í mesta lagi í 12 vikur og um veturin heilt upp í hálvt ár. Um neyðugt kundi útlánstíðin leingjast til tað dupulta, um so var, at útlæntu bøkurnar ikki vórðu umbidnar av øðrum.

Fyri tilfar, sum var lænt í sambandi við vísindaligt arbeiðið, vóru serligar reglur galdandi:

*Til videnskableigt Brug kan et Værk beholdes paa længere Tid Naar derom gjöres Anmeldelse til Bestyrelsen.*

Hugsanin um, at øll, óansæð bakgrund, skuldu hava fría atgongd til bókasavnið í Havn, var í hesum føri ikki einans galdandi fyri ymiskar sosialar bólkar. Stjórnin fyri Færøe Amts Bibliothek royndi við ásetingum í reglugerðini fyri útlánið eisini at bøta um møguleikarnar hjá fólki, sum búði í útjaðaranum, at læna bøkur. Hvussu væl hesin økismenningarpolitikkur eydnaðist, sigur fyrsta gerðabókin tó ikki so nógv um.



**Mynd 4.** Jens Davidsen (1803-1879) kom til Havnar sum smádrongur at ganga í skúla hjá Jens Christian Svabo. 14 ára gamal fekk hann arbeiði á amtsskrivstovuni, og har var hann skrivari alla ævi sína. Hann gjørdist fyrsti bókavørður og roknskaparmaður.

**KELDUR:**


"Forhandlings Protokol for Færöe Amts bibliotek 1831-42", Landsbókasavnið.

Jacobsen, M.A.: "Føroya Amts Bókasavn 1828-1928: minningarrit", Tórshavn 1929.

Patursson, Marjun: "Oplysning eller vækkelse – om det 'moderne' folkebibliotek på Færøerne", afgangsprojekt, Det Informationsvidenskabelige Akademi, 2010.



Ókendur leiklutur hjá Føroyum

# ARKTIS

## EITT NÝTT GEOPOLITISKT KVØRKRATAKSØKI

Seinastu árini hava vit hoyrt alsamt meir um broytingarnar í Arktis og hvussu stóran týdning, hetta hevur fyri Føroyar. Eisini hava vit havt fleiri vitjanir av útlendskum sendifólkum, sum vísa Føroyum ein áhuga, sum vit als ikki eru von við. Og úti á Tinganesi hevur Landsstýrið latið gera eina føroyska arktiska strategi: „Føroyar eitt land í Arktis". Orsøkin er globala upphitingin og tær fysisku broytingarnar í Arktis, sum fylgja við. Hetta hevur givið Føroyum ein nýggjan leiklut og týdning, sum vit ikki hava havt fyrr. Men hvat snýr alt hetta seg um? Hví hava broytingarnar í Arktis so stóran geopolitiskan týdning, at eisini lond uttan fyri Arktis vísa hesum øki alsamt størri áhuga? Her er eitt boð: eitt nýtt geopolitiskt kvørkrataksøki er við at taka skap í Arktis. Hetta kunnu onnur lond ikki uttan víðari lata fara framvið. Tey mugu gera sítt til at ávirka hesa gongd til teirra fyrimun og tryggja sær, at tey ikki verða við sviðusoð – á so diplomatiskan hátt, sum til ber, sjálvandi.



**Jens Chr. Svabo Justinussen**
jensj@setur.fo

Lektari,
Fróðskaparsetur Føroya



**Globala upphitingin** er ikki javnt býtt um allan knøttin. Nøkur støð hitna skjótari enn onnur, og Arktis er eitt sovorðið stað. NASA (amerikanska loftferðslu- og rúmdarumsitingin) metir, at upphitingin í Arktis er umleið tvær ferðir so stór sum miðalupphitingin av jørðini. Hetta hevur gjørt, at ísurin, sum annars hevur gjørt Arktis nærum óatkomiligt í fleiri túsund ár, er farin at bráðna.

Hetta hevur ført til eina ógvusliga andsøgn: øðrumegin kann globala upphitingin broyta fortreytirnar fyri øllum lívi á jørðini – og eingin veit, hvussu hetta kemur at spæla av. Hinumegin hómast nýggir møguleikar, sum vit heldur ikki kunnu lata eyguni aftur fyri. Eitt er, at alheimsins lond mugu royna at basa veðurlagsbroytingunum (t.d. minka um $CO_2$ útlát), men samstundis mugu tey eisini royna at fáa sum mest burturúr teimum møguleikum, sum globala upphitingin hevur við sær.

Í hesari greinini verður bara hugt eftir, hvørjar geopolitiskar broytingar globala upphitingin hevur við sær í Arktis, og mett verður um tann møguliga týdning, ið hetta kann hava fyri Føroyar.

Siglingarleiðin tvørtur um Arktis er eykend við at øll skipaferðsla skal ígjøgnum Beringsstrætið fyri at koma úr Norðuratlantshavinum og yvir í Kyrrahavið og øvut. Hetta er eitt smalt øki, sum er umleið 82 km til longdar og er sum ein fløskuhálsur. Longu nú hava USA og Russland gjørt uppskot um, hvussu hetta í framtíðini kann skipast sum ein tvísporað siglingarleið. Av tí at øll skipaferðsla skal ígjøgnum hetta økið, kann hetta økið roknast sum eitt kvørkrataksøki. Tað merkir eitt strategiskt øki, sum hevur serliga stóran geopolitiskan týdning.

FAKTA:
### TILFEINGI Í ARKTIS

Amerikanska Jarðfeingið (United States Geological Survey) metti í 2009, at umleið 30% av heimsins gasskeldum og 10% av heimsins oljukeldum, sum enn ikki eru funnar, liggja í Arktis. Harafturat verður mett, at stórar nøgdir av virðismiklum mineralum eru at finna í Arktis.

Í Grønlandi liggur ein tann størsta goymslan av sokallaðum 'Reare Earth Minerals'. Hetta er tilfar, sum er neyðugt fyri at gera elektroniskar lutir, og verður roknað sum eitt strategiskt tilfeingi, tí uttan hetta tilfar ber ikki til at byggja teldur, fylgisveinar, fartelefonir og tílíkt.

Tann digitala øldin hevur sostatt tørv á tilfarinum í Grønlandi. Harumframt er talan um stórt havtilfeingi, og eingin veit við vissu, hvussu nógvur fiskur goymir seg undir ísinum og als ikki, hvussu tað fer at verða, tá ið havið gerst heitari í framtíðini.

Umframt olju, gass, mineralir og fiskatilfeingi í Arktis, so fer eitt ísfrítt arktis eisini at gera tað møguligt at lata upp nýggjar siglingarleiðir tvørtur um Norðpólin. Hetta fer at stytta um siglingarleiðina millum Evropa og Asia munandi – umleið 30%. Alheims lond hava áhuga í hesum. Tað er ikki bara tí, at tað kann spara teimum tíð og pening, men eisini tí tað kann geva eitt alternativ til ótryggu leiðirnar í Miðeystri og sum heild tí tað er betri at hava fleiri siglingarleiðir í at velja enn bert ta einu. Skuldu trupulleikar staðist á einum stað, so ber til at fara hinvegin. Hernaðarliga hevur tað eisini týdning, at tú kanst flyta ein flota úr Kyrrahavinum í Norðuratlantshavið so skjótt sum gjørligt, ístaðin fyri ta longu leiðina umvegis Suðurafrika.



## Ísurin bráðnar

Við tíðini fer ísurin at bráðna, og so hvørt sum tað gerst meira atkomuligt at sigla tvørtur um Arktis, fer strategiski týdningurin, sum hetta økið hevur, eisini at gerast størri. Seinastu 20 árini er ísurin um summarið minkaður við 12,8% tíggjunda hvørt ár (í mun til meðalhitan í tíðarskeiðinum 1981-2010), og NASA metir, at miðskeiðis í hesari øldini – tað vil siga um eini 32 ár – verður ísfrítt um summarið.

Væntað verður tí, at siglingarleiðirnar umvegis Arktis longu í hesari øldini kunnu gerast eitt týðandi alternativ til vanligu siglingarleiðirnar um Suez, Panama ella Malakka. Nógv bendir á, at hetta helst verður fyrr enn tað, tí longu í ár, 2018, hevur Mærsk shipping siglt tvørtur um Arktis við farmaflutningi, og russisku megin er longu ein farmaleið latin upp, har ið skip verða førd ígjøgnum við hjálp frá russiskum ísbrótarum. Og Kina, sum ikki er ein arktisk tjóð, hevur bygt tveir ísbrótarar, sum virka í Arktis og hava ført kinesisk skip tvørtur um Arktis.

Okkara megin Arktis, Norðuratlantshavsmegin, kann eisini verða talan um møgulig kvørkrataksøki. Tað sokallaða „GIUK gap", tað er økið millum Grønland, Ísland, Føroyar og Stórabretland, kann gerast eitt kvørkrataksøki fyri ferðsluna, sum kemur norðanífrá og vil út í Atlantarhavið

FAKTA:
### HVAT ER EITT KVØRKRATAKSØKI?

Eitt kvørkrataksøki (á enskum: choke point) er eitt øki, sum øll ferðsla skal ígjøgnum fyri at koma yvir í eitt annað geografiskt øki. Tann, sum ræður yvir einum sovorðnum øki, hevur ein stóran strategiskan fyrimun. Hetta kann samanberast við eina pulsæðr: eitt trýst á pulsæðrina kann steðga blóðflutninginum til heilan og gera stóran skaða.

Tá ið tað kemur til siglingarleiðir, so eru nøkur øki meira viðbrekin enn onnur øki. Um eitt øki, har ið øll skipaferðsla skal ígjøgnum, verður avbyrgt, so hevur tað við sær, at samfelagshjólini um allan heim steðga upp. Tí verða sovorðin øki eisini nevnd kvørkrataksøki.

Kend kvørkrataksøki eru eitt nú Suez- og Panamaveitin og í Fjareystri Malakkastrætið. Men eisini eitt øki sum t.d. Krim í Svartahavinum er eitt dømi um hetta. Hetta eru øki, sum hava verið serliga umstrídd. Í Suez var kríggj í 1956.

Í 1989 sendi Bush herin inn í Panama fyri at tryggja teirra rættindi har, og í 2014 varð Krim-hálvoyggin hertikin av Putin og limað inn í Russland.

Kvørkrataksøki eru viðbrekin, og stórveldini hava víst, at tey halda sær ikki aftur at brúka hermegi, um tað er neyðugt fyri at tryggja sær síni áhugamál í hesum økjum. Í Arktis er tað serliga Beringsstrætið, sum er at rokna sum ein sovorðið framtíðar kvørkrataksøki. Her er tað tó eingin ivi um, hvør ið ræður: Russland og USA.

## Tann, ið ræður, fær ávirkan

Tann, sum ræður í Arktis, fer sostatt at fáa stóra ávirkan á allan heim.

Londini í Arktis vilja tí tryggja, at *tey* koma at ráða í hesum øki. Hetta er eisini tað, sum veruliga liggur aftan fyri Illulisatt-sáttmálan – at arktisku londini USA, Russland, Kanada, Danmark og Noreg saman vilja senda ein boðskap til alheims lond, um at her ráða tey. Stórveldi uttan fyri Arktis sum Kina, India og ES og eisini minni lond sum Korea, Japan og Singapore royna hinvegin at tryggja *sær* so stóra politiska, búskaparliga og hernaðarliga ávirkan á økið sum til ber. T.d. segði kinesiski adminiralurin Yin Zhuo: „Arctic belongs to all the people around the world, as no nation has sovereignity over it ... China must play a indispensable role in the Arctic exploration as we have on fifth of the world's population". Kina eins og fleiri onnur lond í heiminum vilja tryggja sær, at tey ikki verða hildin uttanfyri í Arktis og teir framtíðar møguleikar, sum fara at koma har.



## Føroyar mugu kenna sín leiklut

Samanumtikið eru nógvar góðar grundir til, at stórveldini vísa Arktis áhuga: stórar óbrúktar goymslur av olju, gassi, mineralum og nýtt havtilfeingi, nýggjar siglingarleiðir og ikki minst: eitt nýtt geopolitiskt kvørkrataksøki er við at taka skap, sum stór kapping er um og sum alneyðugt er at hava tamarhald á.

Norðan fyri Føroyar liggur sostatt ein risastórur geopolitiskur pallur, og Føroyar eru, um ikki mitt í leikinum, so við á pallinum og mugu finna sín egna leiklut.



# MYNDIR FRÁ **VÍSINDAVØKUNI 2018**



Lærarar og næmingar frá Skúlanum á Fløtum eru komnir á Vísindavøku.





Áhugin fyri fiskum er altíð stórur á Vísindavøkuni.



Heiðurslønin fyri framúr góða almenna miðling av gransking varð latin Magna Mohr.



Vísindavøkan 2018 var hildin í Sjóvinnudeplinum.



Myndir: Gransking.fo



FØROYAPRENT I SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705